Síða 3

# FF bladid

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 366 Hósdagur 4. mai 2006 15,-

# ALS skal ikki nertast!

**100% tryggleika?**





**Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!**

petur & petur • 320870

**Mobil Oil Føroyar**

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo




## Hetland kundi klárað seg sjálvt

Áhugaverdar frásagnir úr Hetlandi í hesum og komandi blaði.

Síða 20

## Tilfeingisgjald: Fupp ella fakta

Fiskimenn eru á varðhaldi.

Síða 21






## 226 lúsasløg í Nólsoy

Vit hava vitjað Jens-Kjeld Jensen.

Síða 17

**KÄRCHER**

Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.





Vit umvæla eisini

**TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL**
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

## Vónir fyri fiskimonnum í ALS

Dyrnar gloppaðar fyri eini loysn.

Síða 19

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**

**- kemur út annanhvønn hósdag**

FF-blaðið
www.fiskimannafelag.fo




P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

# Til minnis um Jastrid

Sjálvan páskadag frættist, at Jastrid var farin bert 72 ára gomul. Hetta setti beinanvegin tankarnar 50 ár aftur í tíðina – heim til Norðragøtu og heim til Gittu og Bernhard, sum vóru verforeldur Jastrids.

Her komu vit at hittast. Húsið hjá Gittu, sum annars var fastur Palle Bager, umrøddur í seinasta blað, var altíð fult av lívi. Gitta var eitt lívstykki, sum altíð skemtaði og var í góðum lag. Tí komu eisini altíð nógv fólk higar. Her búði Marno, sum ikki giftist, og sum eisini var ein skemtari. Stundum komu sonurin Alfred og kona hansara Jenny á vitjan! Tað, sum ikki hevði verið áðrenn, bleiv tá. Alfred hevði tað prinsipp, at hann skuldi hava eina aðra meining enn øll onnur. Fyri at vera heilt vísur í at vera í andstøðu við øll hini, lætst hann at vera stalinistur. Tað virkaði hvørja ferð!

Lena var tann elsta av systkjunum. Hon var tá gift við Erik í Køkinum og búði inni í Kongsbø. Bjarni var yngstur av systkjunum. Hann var komin nógv til Vágs, og her hevði hann hitt Jastrid, og tey giftust mitt í 50-unum.



*Jastrid saman við miðlingasoninum Jan.*

Tey vóru ofta heima hjá Gittu og Bernhard, har eg sjálvur kom dagliga. Her fekk eg tokka til Jastrid. Hon gjørdi ikki so nógv um seg, men hon tryggjaði í hvussu er, at tað var jarðarsamband í húsinum. Minnist at vit plagdu at spæla Ludo.

Jastrid var ættað úr Sumba. Foreldur hennara vóru Jensia, ættað av Tvøroyri, og Jacob Kjærbo, Eystan á. Jastrid átti 7 systkin.

Fyrstu árini, Jastrid og Bjarni vóru gift, búðu tey í Havn. Bjarni var maskinmaður og dugnaligur eisini, so boð vóru send eftir honum. Tískil flutti tey til Grønlands í nøkur ár, har Bjarni sigldi.

Tey komu heim aftur og búsettust í Havn. Her hevði Jastrid til arbeiðis at ansa eftir børnum heima við hús. Hetta egnaði hon seg væl, tí sum sagt verður um hana, so hevði hon heimsins størsta tol. Hetta var eisini hennara fremsta eyðkenni. Hon gjørdi annars ikki nógv burtur úr sær sjálvari. Tað var hon alt ov beskeðin til. Men hon tók sær av øðrum uttan háva. Ein serliga góður eginleiki hennara var, at hon altíð var í parti við tí veika, og kundi vissuliga eisini hava sína meining.

Eg var onkuntíð inni á gólvinum hjá teimum í Havn, og tey vóru bæði serstakliga blíð, og hetta er eisini tað ummæli, sum ættin hjá Bjarna gevur Jastrid. Tey komu av bygd og vóru altíð væl móttikin. Tá Ólavsøka var við øllum tí, sum hon kundi føra við sær av náttarlívi o.ø., stóð hurðin altíð opin.

Fram um alt var tað familjan sum stóð henni næst. Tey áttu tríggjar synir, Bernhard, Jan og Bjarni, sum allir eiga børn. So har var heilt fitt av barnabørnum, sum Jastrid eisini tók sær av við øllum tí kærleika, sum ein omma nú eina fer kann hava.

Bjarni gjørdist heilsuveikur, og hann doyði brádliga í 1998. Tá flutti Jastrid aftur til Sumbiar, har hon var nøkur ár.

Hon helt tað vera stuttligt at koma aftur til heimbygdina. Men fyri eini tíð síðani kom hon aftur til Havnar, tí hon vildi vera nærri hjá sínum kæru. Men hendan tíðin gjørdist ikki long, og nú legði hon árarnar inn.

Ærað veri minnið um Jastrid.

***Óli í Tjørnustovu***

Nú kanst tú søkja um

**Stuðul til gransking, menning og nýskapan**

Í ár eru økini "Mentan", "Náttúra og náttúrutilfeingi" og "Tøkni" raðfest, soleiðis at verkætlanir innan hesi øki hava serligan fyrimun.

Innan økið "Tøkni" verður stuðul latin til í mesta lagi 50% av kostnaðinum.

**Stuðul verður latin:**
- føroyskum granskarum og granskaralesandi
- gransking, menning og nýskapan á ella í tilknýti til føroyskar granskingarstovnar og vinnufyritøkur
- gransking, menning og nýskapan, ið hava týdning í føroyskum høpi.

**Stuðul verður latin til ymisk sløg av verkætlanum:**
- smærri verkætlanir við styttri tíðarætlan
- post grad. ella post doc. verkætlanir, ið ganga um fleiri ár
- ph.d.-verkætlanir.

**Tað er ein fyrimunur, at:**
- verkætlanin fevnir um samstarv millum fleiri granskarar
- verkætlanin fevnir um samstarv millum granskarar, granskingarumhvørvi og vinnuna
- umsøkjari fær stuðul aðrastaðni eisini.

Umsóknir skula skrivast á skandinaviskum ella enskum máli á serligt oyðublað, ið fæst á skrivstovu ráðsins og á heimasíðuni, www.gransking.fo.

Nærri frágreiðing um raðfestu økini og skrivlig vegleiðing fæst á somu støðum.

**Umsóknarfreist er:**
1. september 2006, kl. 12.00

Hugsjón

Vit vilja
- at gransking í Føroyum skal vera á altjóða stigi
- birta upp undir menning og nýskapan
- leggja dent á øki, har vit hava tilfeingi at gera rannsóknir
- at fremsti førleiki og vitan um land og fólk skal finnast í Føroyum

Vit eru sannførd um
- at gransking, menning og nýskapan eru avgerandi liðir í at brynja okkum til avbjóðingarnar í einum heimi í støðugari broyting

Vit ynskja
- dyggari grundarlag fyri avgerðum
- betri tillagingarførleika í altjóðageringini
- betri kunnleika til burðardygga umsiting av náttúrutilfeingi
- størri virði í føroyskari framleiðslu og útflutningi
- hægri vitan og tilvitan um mentan og samfelag

Grundstøðið er
- at grundgransking er neyðug fyri at fáa til vegar vitan til gagn fyri samfelagið
- at nýtt gransking mennir vinnulív og samfelagstænastur
- at samstarv og samskipan eru fyritreytir fyri nyttuvirði av gransking, menning og nýskapan

sansir.fo

**Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki**
- at ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum.
- at umsita Granskingargrunnin, sum veitir fígging til gransking, menning og nýskapan.

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 65 15 · Faks 35 31 01 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo

Fakfeløgini til § 25 nevndina:

# ALS skal ikki nertast!

Týsmorgunin vóru fakfeløg á fundi við § 25 nevndina hjá løgtinginum um tann partin av uppskotinum um játtanarskipan landsins, sum snýr seg um ALS og grunnar. Uppskotið snýr seg um, at ALS grundleggjandi skal á fíggjarlógina, og harvið kemur undir ræðið hjá løgtinginum. Hetta vil arbeiðsmarknaðurin í síni heild ikki vita av, og feløgini kunnu prógva, at tað eru ikki sakligar orsøkir fyri hesum stigi. Fakfeløgini hava leingi roynt at fáa fund við § 25 nevndina, sum umboðar allar flokkar. Her var boðskapur klárur: ALS og hinir grunnarnir skulu ikki nertast!

Handað varð nevndini bræv við skjalatilfari, sum lýsir hetta mál, og endurprenta vit hetta bræv:

Málið um játtanarskipan

Vit vilja siga nevndini frá, at fakfeløgini á ongan hátt góðkenna tann partin av uppskotinum um játtanarskipan, sum inniber, at gjøld – sum gjaldið til ALS – skulu metast sum skattur, og at tey harvið skulu setast á fíggjarlógina, eins og ætlanin er at gera við øðrum grunnum.

Vit vilja meta eina slíka samtykt í løgtinginum sum eitt beinleiðis álop á áhugamál hjá fakfeløgunum og teirra limum.

Í hesum sambandi vilja vit gera vart við fylgjandi:

Ivi um álitið frá 2001

Upprunaliga grundgevingin fyri hesi ætlan er sokallaða "álitið hjá fíggjarmálaráðnum frá 2001". Her vilja vit gera vart við, at hetta álit er gjørt av starvsfólki í fíggjarmálaráðnum, har einki er komið fram um teirra serliga førleika á hesum øki. Eingin løgfrøði uttanfyri almennu skipanina hevur tikið undir við niðurstøðuni í álitinum. Tað eru eisini løgfrøðingar innan almennu skipanina, sum meta álitið at vera sera tunt og illa undirbygt. Realurin er eitt gott dømi um hetta, sum ein stovnur, sum fyrr hevur verið undir danskari lóggávu uttan at hava verið á donsku fíggjarlógini ella statsroknskapinum.

Tí kann staðfestast, at fíggjarmálaráðið hevur ikki somu tulking sum danskir myndugleikar av somu orðing í grundlóg og stýrisskipanarlóg. Danir hava hóast alt meira enn 150 ára royndir av síni umsiting av grundlógini og mugu metast at umboða røttu fatanina av hesum spurningi. Vit halda tað ikki kunna bera til at gera serføroyskar tulkingar av eini siðvenju, sum hevur verið galdandi í ríkinum í nógv ártíggir fyri tað, um hetta hóvar politiskum áhugamálum í Føroyum.

Hóast tað er víst til júst hetta frávik bæði í brævaskifti við fíggjamálaráðið og alment, so er eingin nøktandi frágreiðing komin frá fíggjarmálaráðnum. Tí góðkenna vit ikki á nakran hátt, at so avgerandi broytingar verða gjørdar á so ivasomum grundarlagi sum hesum áliti.

Verður tað fyrst gjørt í hesum máli, skapar hetta siðvenju fyri, at hetta kann gerast á øðrum økjum eisini.

Álitið um játtanarskipan hevur *eina* reglu um hetta mál

Tað, sum stendur í álitinum um játtanarskipan, er heldur ikki nøktandi. Tilvísanin til allýsing um skatt hjá OECD og IMF er ikki undirbygd við einum orði í hesum yvir 100 síður stóra áliti. Heldur tykist henda allýsing at vera potað inn í álitið við endan av viðgerðini í eini reglu. Tað er eisini longu víst á, at júst hetta mál er ikki so einfalt, sum tað verður gjørt til.

Tí er so púra einki grundarlag fyri at nýta hetta álit sum grundarlag fyri nakrari sum helst støðutakan á hesum øki.

Kvalifiserað løgfrøði sigur ongan vanda vera á ferð

Tann mest kvalifiseraða løgfrøðiliga viðgerðin av hesum máli er gjørd av tí bólki av seks av okkara fremsti løgfrøðingum, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum setti at viðgera hendan spurning. Her er bólkurin í minsta lagi samdur, at verandi ALS skipan er ikki ólóglig, og undirtøkan í álitinum hjá hesum bólki fyri álitinum frá 2001 er sera avmarkað.

Ber til at broyta eina allýsing (definitión) sum vindurin blæsur?

Vit vilja gera vart við, at løgtingið longu hevur gjørt allýsing av skatti. Hetta varð gjørt í desember 2005 í samband við málið um barsilsskipanina. Tað liggur í "sagens natur", at ein allýsing av einum fyribrigdi verður bert gjørd eina ferð. Tað vil vera púra oyðileggjandi fyri trúvirðið hjá politisku skipanini, um sama ting bert fáar mánaðir seinni fer at gera eina nýggja allýsing, og tað enntá á einum so tunnum grundarlagi, sum her er talan um.

Tað kann eisini verða nevnt, at tann umstrídda lógin um barsilsskipan fekk við 3. viðgerð við síni, samb. løgtingsskrivstovuni "ólógligu", heimild til landsstýrismannin at áseta barsilsgjaldið, atkvøðu frá 19 av 29 tinglimum. Millum teir, sum atkvøddu fyri, vóru løgtingsformaðurin og formaðurin í § 25 nevndini.

Álop á rættartrygd

Ein samtykt, sum her liggur á borðinum, meta vit vil vera eitt groft álop á rættartrygdina hjá borgarunum. Vit kundu nevnt onnur mál, har tað er veruligur tørvur á greiðum reglum fyri at tryggja rættarstøðuna hjá borgaranum, men her tykist eingin áhugi at vera frá somu politikkarum og umsiting, sum brúka sínar kreftir uppá hetta mál.

Tí góðkenna vit onga undanførslu fyri at fremja ætlanina, sum liggur í hesum máli viðvíkjandi ALS.

Annars vísa vit til hjáløgdu skjøl, sum undirbyggja hesi sjónarmið.

Hetta bræv saman við skjalatilfari er til skjals á heimasíðunum:

**www.fiskimannafelag.fo**

**www.fafelag.fo**







*Fakfelagsfólk úr yvir 10 feløgum vóru væl mannað á fundinum við §25 nevndini týsdagin. Tað skiltist, sum at einki uppskot fór at koma úr nevndini hesa tingsetuna, so fyribils verður einki burtur úr ætlaðu ognartøkuni av ALS. So er í hvussu er tað komið burturúr. Men tað verður neyðugt at verða á varðhaldi!*


## Starv í fíggjarumsitingini

Landsbankin søkir eftir einum fólki til fíggjarumsitingina at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðsuppgávur:
- Íløgur og peningamarknaður
- Gjaldførisrøkt
- Peningastovnsavgreiðslur
- Back-office
- Roknskapur og fíggjarætlan

Uppgávurnar í bankanum eru býttar í arbeiðsøki, men stovnurin er lítil og uppgávurnar breiðar. Tí verður nógv arbeiði gjørt í verkætlanum, eins og tað er skiftandi.

Førleiki:
Praktiskar royndir og viðkomandi útbúgving eru neyðugar.

Løn:
Eftir avtalu við støði í sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Tíðarfreist o.a.:
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra, tel 308126 (sigurd@landsbank.fo) ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra, tel 318122 (jem@landsbank.fo) um fleiri upplýsingar.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir sendast landsbankanum áðrenn 19.05.2006 kl. 16.00.

Landsbanki Føroya
Governmental Bank
Müllers Hús – Gongin
Postrúm 229 – FO-110 Tórshavn
E-postadr.: landsbank@landsbank.fo

*Landsbanki Føroya er bankasamband landsins. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar.*

*Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna http://landsbank.fo*



## Vit hava útgerðina



Flótitrol | Snurpunótir
Botntrol | Aliútgerð
Rækjutrol | Annað

**VÓNIN**

**Høvuðsskrivstova:**
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 474 200
Telefax 474 201

**Tórshavn:**
Vestara bryggja 12
100 Tórshavn
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

info@vonin.com - www.vonin.com

# Á Sjóbjargingarstøðini í Reykjavík

Í undanfarnum bløðum hava vit havt fleiri frágreiðingar frá ferð í Íslandi, sum vit gjørdu um mánaðarskiftið mars / apríl.

Vit hava tvær frásagnir eftir frá hesi ferðini. Onnur er um tann skjótt 100 ára gamla Oskar Jensen, har vit greiða frá um, tá vit vitjaðu hann. Tað vísir seg nú, at Oskar hevur eina enn meira áhugaverda søgu enn vit varnaðust. Hana fara vit at hava í okkara siðsøguliga parti í blaðnum, sum kemur 15. juni, og hetta verður áhugaverdur lesnaður.

Ein annar, sum vit annars hittu í Íslandi, var Harald S. Holsvik. Navnið bendir á, at hansara ætt kemur úr Noregi.

Vit hittu hann fyrstu ferð á eini ITF fakfelagskongress í Italia í 1990, har hann luttók sum dagligur leiðari fyri íslendska yvirmannafelagið FFSÍ, sum vit hava havt nógv samband við eins og við Sjómannasambandið. Síðani 1994 hevur Harald havt starv á Reykjavík radio og parttíðararbeiði á Stýrimannaskúlanum, sum nú kallast Fjøltækniskóli Íslands, og har teir íslendsku yvirmenninir fáa sína útbúgving. Hesin skúlin liggur beint við føroyska sjómansheimið Ørkina. Her hevur Harald havt frálæru í teimum sokallaðu GMDSS-skeiðunum, sum snúgva seg um samskifti í neyðarstøðu.

Nú er Harald virkin í íslendsku sjóbjargingartænastuni, sum liggur beint við flogvøllin í Reykjavík. Vit høvdu ikki nógva tíð, áðrenn flogfarið fór. Men Harald fekk skipað fyri einari stuttari vitjan á vegnum til fráferðina til Føroyar.

Tað er kent, at íslendingar hava verið sera tíðliga á sjóvarfallinum, tá tað snýr seg um eftirlit á sjónum og sjóbjarging. Tað eru allar grundir til tess, tá hugsað verður um, hvussu vandamikið havið kring Ísland er. Hetta kenna vit føroyingar alt ov væl. Somu royndir hava íslendingar. Hildið verður, at 3000 íslendingar eru deyðir á sjónum, og hetta hevur gjørt sítt til, at íslendingar hava rættiliga gjørt seg út á hesum økinum at gera arbeiðið á havinum so trygt sum gjørligt.


*Harald S. Holsvik og Óli Jacobsen í ervinum hjá Oskari Vigussyni.*


*Manning á sjóbjargingarstøðini.*


*Manning á sjóbjargingarstøðini.*


*Íslandskortið hjá landhelgisgæsluni, sum vísir hvar skip og flogfør eru stødd.*

Hetta hevur eisini verið gjørt av fólkinum sjálvum við teimum mongu bjargingarfeløgum, sum eru kring landið. Tað kann eisini verða nevnt, at á landi í Íslandi er eisini vandafult. Fyri tað fyrsta er landið so stórt, og tað er meira útsett fyri náttúruvanlukkum enn Føroyar eru. Vit kunnu bert hugsa um øll tey gos, sum hava verið og eru. Fremst í huganum er gosið í Vestmannaoyggjunum, har tað eftir stuttari tíð eydnaðist at fáa alt fólki óskalað av oynni. Onnur dømi eru skalvalopini uppi á Vestfirðum.

Tað eru mong ár síðani, at teir í Íslandi gjørdu ta skipan, at skip skuldu boða frá hvønn dag, hvar tey vóru stødd. Boðaðu tey ikki frá, vórðu tiltøk sett í verk at finna út av, um eitthvørt var áfatt.

Nú er alt sum eitur bjarging savnað í Bjørgingarmiðstøðin Skógarhlíð í bygningi, sum varð bygdur sum brandstøð í 1966-67. Brandstøðin var einsamøll her til fyri 10 árum síðani, tá byrjað varð at flyta allar stovnar higar, sum hava við neyðstøðu og bjarging at gera. Síðani 2004 er hetta meginstøðin fyri allari bjarging á sjógvi og landi. Her húsast sjey ymiskir stovnar, sum virka á hesum øki, sum t.d. løgreglan. Øll 112 uppkall kom inn higar.

Íslendska bjargingarfelagið Slýsavarnafelagið Landsbjørg heldur eisini til her. Hetta felagið hevur 103 deildir kring Ísland. At hesi feløg hava havt stóran týdning lýstu vit m.a. við frásøgnini um, tá trolarin "Egil Reyði" fór á land á Vestfirðum í 1955.

Teir stovnar, sum í størsta mun hava við veiðuflotan at gera, eru Landhelgisgæsla Íslands (LHG) og Vaktstøð siglinga, har Landhelgisgæslan hevur ta fakligu leiðsluna. Hjá teimum er eisini MRCC-støðin í Reykjavík. Frá 1. mai verða tey, sum arbeiða Vakstøðini, starvssett hjá LHG í framhaldandi samstarvi við 112 skipanina og Slýsavarnafelagið Landsbjørg.

Landhelgisgæslan hevur høvuðsábyrgdina av leiting og bjarging í íslendska havøkinum í samvinnu við aðrar stovnar, bæði íslendskar og útlendskar. Stovnurin hevur til taks skip, flogfør og tyrlur til hesar uppgávur. Teir taka sær eisini av bjargingartiltøkum á landi um brúk er fyri tí.

Vaktstøð siglingina er ein samskipan av Landhelgisgæslan, 112 skipanini og bjargingarfelagnum Landsbjørg. Her verður serligur dentur lagdur á at veita hjálp til sjófarandi, sum hava brúk fyri hjálp. Hetta kann vera, tá menn koma til skaða, og tað er neyðugt at senda tyrlu eftir teimum. Eisini skipa teir fyri at hava útgerð, sum kann bøta um trygdina. Sum dømi um hetta er útgerð sum sjálvvirkandi gevur boð frá sær í neyðstøðu.

Samstarvsavtala er millum allar stovnarnar og óneyðugt er at siga, at vakt er alt samdøgrið. Stovnarnir hava alla hugsandi útgerð til hjálpar, og telduútgerðin er tann fremsta sum finst.

Fyri at vera sum frægast tilbúnir verður eisini skipað fyri bjargingarroyndum. Herfyri høvdu teir eina sum kallaðist Bergrisinn. Hon gekk í stórum væl, men nú verður eftirmett, hvat ið kann gerast betri.

Tey, sum vilja vita meira um hetta virksemi, kunnu fara inn á heimasíðurnar:

**www.lhg.is** og
**www.vaktstod.is**

Vit lýsa støðina við myndum, sum vit tóku undir vitjanini.

# Meira um Hetland og tuberklasøguna í komandi blað

Sum vit greiddu frá í seinasta blað var stjórnin í Fiskimannafelagnum á námsferð í Hetlandi 21-23. apríl. Sigast kann, at nógv kom burturúr. Vit vilja eisini gera nógv burtur úr at kunna um Hetland, ikki minst nú vit enntá fáa eina beinleiðis Atlantsflogrutu hagar.

Tær fyrstu greinirnar um ferðina eru í blaðnum í dag, men tað fer at koma meira tilfar í komandi blað. Vit kunna fyrst og fremst um fiskivinnuviðurskifti, men eisini um viðurskiftini í Hetlandi í síni heild. Vit vænta, at okkara lesarar fara at hava áhuga fyri hesum.

Meira um tuberklasøguna

Í næstseinasta blaði høvdu vit frásøgn um "pirkuna", Marin Skipanes, og var hetta eitt gott íkast til søguna um tuberklarnar saman við grein hjá Katrin Dahl um Dr. Magnussen.

Henda frásøgnin varð gjørd í sambandi við, at Marin fylti 90 ár. Tann 21. mai verður ein annar lyklapersónur í tuberklasøguni 90 ár. Hetta er Nikael Thomsen, ættaður úr Syðrugøtu, men búsitandi í Hoyvík. Hann royndi tuberklarnar bæði sum sjúklingur og sum starvsmaður á Sanatoriinum.

Í hesum sambandi fara vit í tveimum teimum komandi bløðunum at hava lívssøguna hjá Nikael, og verður hetta enn eitt íkast til søguna um tuberklarnar. Her verður mangt áhugavert, sum ikki nógv er skrivað um frammanundan. Hetta er ein grund til at lesa FF-blaðið.

Hurluvasi um samdøgursfrádrátt:

# Umsitingin, sum politikkararnir bjóða borgarunum!

**Vit hava fyrr havt drúgvar frásagnir um rættarloysið í málinum viðvíkjandi skatting av kosti hjá sjómonnum. Vit skulu ikki koma nærri inn á hetta mál, men bert nevna, at væntandi fellur skjótt ein avgerð í landsskattanevndini í hesum mánaðinum.**

Men vit skulu her greiða nærri frá mannagongdini viðvíkjandi samdøgursfrádrátti, sum er enn ein váttan av okkara lýsing av almennu umsitingini.

Samb. skattalógini hevur skattgjaldari rætt til frádrátt fyri part av meirútreiðslum til

1. kost,
2. húsaleigu,
3. ferðaútreiðslur og
4. ferða- og sjúkratrygging,

sum hann hevur í sambandi við arbeiði uttanlands á landi ella umborð á skipi.

Hesir frádráttir verða skipaðir við eini kunngerð hjá landsstýrismanninum um "samdøgursfrádrátt", sum ásetir hægstu upphædd, ið kann dragast frá í skattauppgerðini.

Tað er sera trupult at gera eina rættvísa skipan eftir hesum leisti. Grundleggjandi brekið við hesi kunngerð er, at fiskimenn við útlendskum skipum eru bólkaðir saman við handverkarum uttanlands, hóast teirra umstøður eru sera ymiskar. Heilt galið verður tað, tá ikki verður tikin hædd fyri hesum. Tá verður úrslitið tilvildarligt frá persóni til persón, og hetta eigur ikki at koma fyri í einum rættarsamfelag.

### Tveir tættir í samdøgursfrádráttinum

Tað eru tveir avgerandi tættir í samdøgursfrádráttinum. Annar er upphæddin pr. samdøgur, sum kann dragast frá, og hin er sundurgreining av, hvørjar útreiðslur, frádrátturin skal geva endurgjald fyri.

Hetta eru viðurskifti, sum eiga at liggja í eini fastari legu, so løntakarin veit nøkulunda vist, hvat hann skal rokna við. Men so er ikki. Upphæddin hevur ligið millum 100 og einar 500 kr., uttan at tað hevur havt nakað sum helst samband við tann veruliga kostnaðin. **Seinna** upphæddin gevur ríkiligt endurgjald, meðan tann **fyrra** hjá mongum langt frá svarar til eykakostnaðin av at arbeiða uttanlands.

Verri er, at tað er sum best ber til við, hvussu sundurgreiningin av frádráttinum er. Summi ár er tann samlaði frádrátturin galdandi, bert skattgjaldarin kann ávísa, at hann hevur **eina** av umrøddu fýra útreiðslum. Hetta gevur eitt fullkomiliga tilvildarligt úrslit frá einum skattaborgara til annan, og merkir hetta ofta beinleiðis mannamun.

Men onnur ár er frádrátturin býttur upp. Hetta merkir, at ein ávísur prosentpartur av frádráttinum fer til hvørja av nevndu fýra útreiðslunum.

Hetta má so sigast at vera ein meira rímilig skipan, um tað bert var nakað skil í sundurgreiningini og í teimum sum umsita skipanina.

### Dømi um óskilið

Hvussu skilið er skal lýsast við gongdini tey seinastu árini.

Tað seinasta Karsten Hansen – sum fíggjarmálaráðharri – gjørdi á hesum økinum var at koyra frádráttin úr kr. 300 niður í kr. 100 um samdøgrið, sum var uttan nakra sum helst sakliga grundgeving og púra skilaleyst.

Við tí rættarbroti, sum Toll og Skatt hevur framt ímóti teimum fiskimonnum, har kosturin fer av manningarpartinum, fingu hesir fiskimenn ikki eitt oyra í frádrátti fyri ferðaútreiðslur, sum er ein stór útreiðsla hjá júst hesum fiskimonnum.

Hesir hava staðiliga víst Bárði Nielsen, núverandi fíggjarmálaráðharra, á hetta vanbýti. Hann kundi rættað hetta við at ásett, at lógin og siðvenjan viðvíkjandi kosti frá 1963 skuldu fylgjast.

Tað ger hann ikki. Hann velur ta lættari loysnina at halda fast við hetta púra greiða rættarbrot, og síðan í kunngerð at seta samdøgursfrádráttin frá 1. januar 2005 frá nevndu kr. 100 til kr. 300.

Hetta loysir fyri so vítt tann fíggjarliga spurningin hjá hesum fiskimonnum. Men so koma tey eftir á Toll og Skatt, at tað eru aðrir fiskimenn, sum kanska fáa meira enn teimum er ætlað við hesum økta frádrátti, tí teir fáa frían kost og ella fría ferð.

Tað kundi verið nakað um tað. Men hetta visti Toll og Skatt av, tá kunngerðin varð gjørd – í hvussu er um tey høvdu spurt seg fyri. Hetta kundi so verið rættað við eini nýggjari kunngerð.

Men tað hendir ikki. Í staðin ger Toll- og Skattaráð Føroya umsitingarliga eina avmarking í eini kunngerð, sum hevur verið í gildi í eitt ár, og henda avmarking skal galda frá 1. januar 2006. Tað, sum undrar, er, at tað skal bera til hjá einum umsitingarligum myndugleika at broyta innihaldið í eini kunngerð, sum landsstýrismaðurin hevur gjørt og lýst. Hetta er enn eitt dømi um serføroyska løgfrøði, har ongar greiðar reglur skulu galda fyri nøkrum sum helst.

Í einum innanhýsis **rundskrivi** hjá Toll og Skatt verður nú ásett, at av teimum 300 kr., sum samdøgursfrádrátturin er, skulu tey 50% lutast teimum, sum hava útreiðslur av kosti.

Hetta gevur 150 kr, men fiskimenn gjalda umleið 100 kr. um dagin í kosti. Samb. brævi frá Toll og Skatt skal ikki meira trekkjast frá enn tað, sum goldið er. Hetta merkir, at tær 50 kr. "fara til spillis" hjá viðkomandi fiskimonnum, og framvegis lýsti samdøgursfrádrátturin verður á hendan hátt minkaður við umrøddu kr. 50 um dagin.

Síðani verður ásett, at 20% ella 60 kr. fara til húsaleigu. Hetta gjalda fiskimenn ikki, og fáa teir so heldur ikki hendan frádráttin. Tað kann so vera í lagi fyri ta tíðina, teir eru umborð.

Hetta merkir, at nú er samdøgursfrádrátturin knappliga 110 kr. minni um dagin í ár, enn hann var í fjør – við somu kunngerð.

Nú eru 90 kr. eftir. 15 kr. fara til trygging, og slíka hava fiskimenn. Men nú eru so bert 75 kr. eftir til ferðaútreiðslur. Við 200 døgum gevur hetta ein frádrátt uppá 15.000 kr. Fiskimenn í Danmark hava roknað út, at teir brúka tað dupulta, fyri ikki tala um teir, sum búgva longur burtur. T.v.s. at í fjør høvdu teir ein frádrátt, sum í hvussu er svaraði til ferðaútreiðslurnar. Í ár er frádrátturin bert helvtin – við somu kunngerð.

Tað skal sigast, at tað er fullkomin ørskapur at seta frádrátt av ferðaútreiðslum sum ein frádrátt pr. dag. Hetta gevur eitt fullkomiliga tilvildarligt tal, har tað bert er av tilvild, um tað samsvarar við veruligu útreiðslur, sum m.a. valdast í hvørjum landi, fiskimaðurin starvast. Henda skipan er eisini ein beinleiðis forðing fyri at fara longur út í heim at finna arbeiði. Tann einasta rímiliga skipan er, at fiskimenn trekkja frá tær veruligu útreiðslur, sum teir hava.

### Bárður kann ikki svara!

Felagið fyri fiskimenn uttanlands hevur í januar mánaði vent sær til Bárð Nielsen, fíggjarmálaráðharra, um nýggja uppbýtið av samdøgursfrádráttinum.

Hann hevur bara sent málið víðari til Toll og Skatt, sum als ikki svarar, og er hetta fult út í samsvari við tær royndir, teir og vit hava av Tolli og Skatt – uttan mun til hvør ið situr sum landsstýrismaður ella hvørji starvsfólkini eru. Tey eru nevniliga ikki før fyri at grundgeva fyri teirra úr enda í annan vanvittigu umsiting!

Enn eitt dømi um hetta er, at Toll og Skatt enntá krevur, at øll skjøl í sambandi við samdøgursfrádráttin skulu goymast í 5 ár, so stovnurin kann koma aftur umaftur, samstundis sum allir aðrir vanligir skattgjaldarar fáa sína endaligu skattauppgerð nakrar fáar mánaðir eftir, at skattaárið er av.

### Ber til at bjóða borgarum slíkt?

Stutt sagt kann sigast, at skattaviðurskifti hjá fiskimonnum uttanlands eru ein slík fløkja, at eingin kann finna út av, um hann er keyptur ella seldur. Skipanin kundi verið sera greið, so eingin ivi nýtist at vera um rættindini hjá borgarunum.

Men tað tykist at hava verið ein miðvís ætlan – hjá bæði landsstýrismonnum og embætismonnum – at gera skipanina so torskilda, at eingin vanligur maður skal finna útav, hvat er rætt ella skeivt. Myndugleikarnir hava harvið tikið sær definitiónsrættin á einum øki, sum eingin skal sleppa at seta spurnartekin við.

Eitt dømi um hetta er, at Toll- og Skatt hevur tikið sær definitiónsrættin at staðfesta hvat er "frítt".

Fyrst tulka teir eina heilt greiða lógarásetan um, at **"virðið av vistarhaldi hjá sjófólki umborð telist ikki við í skattskyldugu inntøkuna"**, sum um her stendur "**fríum** vistarhaldi". Síðan verður henda sera fría tulking í einum fyrispurningini í løgtinginum lagt sum um hetta var lógarteksturin!

Men henda manipulatión skapar nýggjar ivasamar tulkingar, sum tá kostur fer av óbýttum, og manningin rindar upp til 50% av honum. Tá er talan um "partvíst frían kost". Men samb. Toll og Skatt, skal kosturin í hesum førum metast at vera heilt "fríur". So kunnu teir á sama hátt jonglera við øðrum fyribrigdum, sum so verða nýtt ímóti borgarunum.

Hetta kann bert henda, tí eingin eftirlitsmyndugleiki er. Rættarbrot móti borgarum hava ikki áhuga hjá so mikið sum einum løgtingsmanni. Og løgmaður heldur væl til standa, samb. visjónsfundinum á Hotel Føroyum í februar.

Hetta er rættarstøðan hjá føroyskum borgarum!

## Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- *avrúsan og viðgerð*
- *einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)*
- *samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)*
- *eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi*

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75

Hetland:

# Stuðulssúpan í Ebenezer Hall

**Í Hetlandi og serliga í Lerwick er ein hópur av ymiskum samkomum og kirkjum. Ein av hesum kallast Ebenezer Hall, og tað er ikki so løgið, at hetta fær ein at hugsa um Ebenezer í Havn. Hetta er heldur ikki ógrundað, tí sami William Sloan, sum byrjaði brøðrasamkomuna í Føroyum, var við til at byrja samkomuna í Ebenezer Hall í Lerwick, áðrenn hann kom til Føroyar.**




*Ebenezer Hall í Lerwick, sum gamli Sloan var við til at stovna, áðrenn hann kom til Føroyar.*



*Brian er fiskimaður. Her er hann saman við dótrini Hazel og konuni Rachel, sum er dóttir Edwin Moare.*

Men gongdin í Lerwick tykist ikki at hava verið tann sama sum í Føroyum. Í Lerwick er Ebenezer Hall á sama staði, Navy Lane, og mestsum í sama líki, sum tað hevur verið alla tíðina.

Eins og í Føroyum er útboðið av andaligum tilboðum stórt í Hetlandi. Summi tilboð eru meira lívligt enn onnur. Samkoman í Ebenezer Hall í Lerwick verða roknað fyri at vera heldur konservativ, og er tað ikki so spennandi fyri ungdómin, sum heldur fer hagar, sum meira lív er í. Tískil má sigast, at Ebenezer Hall hevur sæð betri dagar.

Bæði Ebenezer í Havn og Ebenezer Hall í Lerwick hava til felags at vera við at hjálpa neyðstøddum í fyrrverandi kommunistalondunum í Suðureuropa. Í Lerwick eru tey við í einum tvørkirkjuligum felagsskapi, sum kallast Shetland Aid Trust, sum eisini er stuðlað av øðrum. Har royna tey í felag á ymiskan hátt at savna pening inn til umrødda endamál, og tey siga, at tað hevur gingið væl.

Hendan sunnudagin vit vóru í Lerwick var eitt serligt tiltak, har tey savna inn pening til omanfyri nevnda endamál. Hetta tiltak er hvørt ár um hesa tíðina. Tiltakið kann kallast "stuðulssúpan". Tá eru fólk vælkomin kl. 13.30 at fáa súpan við ymiskum sløgum av breyði afturvið. Omaná fáa tey so tær mest leskiligu køkurnar. Tað eru kvinnurnar í samkomuni, sum gera alt hetta. Afturfyri kunnu fólk sjálvi gera av, hvussu nógv tey vilja gjalda, og tey flestu munnu gjalda ivaleyst. Peningurin, sum kemur inn, er eitt gott ískoyti til hjálpartiltøkini.

Tað var sera hugnaligt at kunna vera við til hetta tiltakið. Prátað var við fleiri av teimum, sum vóru her. Nøkur høvdu verið í Føroyum, onnur kendu Margaret Thomson, sum verður umrødd í komandi blað. Tey vistu eisini, at Margaret skuldi fáa vitjan úr Føroyum!

Kom eisini á tal við onkran fiskimann, sum sigldi við uppsjóvartrolara. Jú, segði hann, hetta var als ikki so galið. Men teir lógu leingi, tí teir høvdu ov lítið av kvotum. Nú rokna teir ikki við at fara nakran veg fyrr enn í juli. Brian, sum var meistari umborð, hevði nóg mikið at gera við at vera umborð og ansa eftir.

**Hjálpa í Alabania**

Samskiparin av hjálpartiltakinum er Edwin Moar, sum er ein av monnunum í Ebenezer Hall, og sum eisini er verfaðir Brian. Hann greiddi frá virkseminum í sambandi við hjálpartiltøkini, sum ganga út upp á at senda hjálp til fjallaøkið í Albania ikki langt frá markinum til Kosovo. Her eru fólk ómetaliga fátøk, og hava brúk fyri allari hjálp, tey kunnu fáa. Livigrundarlagið hjá nógvum av hesum fólkum, sum búgva á bygd, er sjey seyðir og kanska ein kúgv. Hetta er júst nóg mikið til at halda teimum á lívi, og so einki meira.

Tað er her, at hetlendingar royna at hjálpa við m.ø. heilivági og tannlæknatænastu. Afturat hesum verða lastbilar fyltir við útgerð av ymiskum slagi, sum verður send til skúlar og barnaheim, og kemur hetta alt sera væl við. Í Hetlandi er tað sum í Føroyum. Fólk hava ov mikið og yvirflóð, sum kann koma øðrum til nyttu á henda hátt.

Hetta er eitt tiltak, sum hevur uppiborið allan møguligan stuðul, og tað var hugaligt at síggja hesar eldsálir, sum á ein og annan hátt vildu gera sítt til at minka um neyðina hjá teimum, sum eru minni væl fyri.



*Edwin Moare, sum er leiðari av Shetland Aid Trust, greiðir frá verkætlanini í Albania.*



*Ein onnur dóttir Moare er Debbie. Hon vónar ikki, at pápin ikki fer nakran veg fyrr enn um 3 vikur, tí tá skal hon giftast. Tey skulu giftast í Ebenezer og skulu hava brúðleyp í býráðshøllini.*

# Viðvíkjandi snelluveiðu á Føroya Banka

Kári P. Højgaard
*Løgtingsmaður*

Til munnligan fyrispurning frá mær í Løgtinginum upplýsti Bjørn Kalsø landstýrismaður, at tað í fiskiloyvunum fyri 2002 hjá einstøkum bátum í bólki 5 stóð sama orðingin sum fyri bólk 4, nevniliga at tveir snelludagar taldu sum ein fiskidagur. Hetta var eitt misstak, segði landstýrismaðurin, og ongar broytingar í lógarverki ella kunngerðum vóru gjørdar fyri hesar bátar, undantikið niðurskurðin 10% árliga í tvey ár.

Sum eg havi fingið upplýst, og sum Mortan Johannesen útróðrarmaður eisini váttaði í lesarabrævi, so hava menn, ið eiga bátar í bólki 5, líka til miðskeiðis í 2005 fiskað og fráboðað til fiskiveiðueftirlitið í tí trúgv, at tveir snelludagar taldu sum ein útróðrardagur.

Mortan setti eisini í lesarabrævinum nakrar spurningar, ið eg enn ikki havi sæð svaraðar millum annað spurningin, um hesir bátar høvdu fiskað ólógliga?

**Landsstýrismaðurin** nevndi trupla umsiting, tí bátarnir í bólki 4 hava sínar fiskidagar, meðan bólkur 5 hevur felags dagatal, og fullriknir útróðrarbátar í hesum bólki hava hægri dagatal á innaru leiðunum.

Á bankanum er ásett dagatal fyri hvønn bátin og tað kennist ikki sørt ørkymlandi, at bátur í bólki 4 við 8-10 snellum fær tveir dagar við snellu fyri ein fiskidag íalt 26, men um fiskifarið hoyrir til bólk 5 og hevur 4-5 snellur, so telur hvør dagur sum ein heilur fiskidagur av tillutaðu 13 døgunum. Hetta kann fáa tað óhepnu avleiðing, at menn heldur velja at fylla smærru førini við línu, fyri at fáa sum mest burturúr. Tað kann verða vandamikið fyri manningina og økir almikið um trýstið á fiskastovnin.

Snellan er bílig í rakstri, brúkara og umhvørvisvinarlig og fer harafturat væl við fiskastovninum; tí verður hesin veiðuháttur loyvdur á gýtingarleið.

Um fiskað verður 3-4 dagar hvønn túr, og ein fiskidagur fer í sigling, verður í besta føri talan um 3 túrar á Bankan fyri bátarnar í bólki 5.

Stór og kostnaðarmikil krøv viðvíkjandi sendara og trygdarútgerð verða sett til bátarnar, ið fáa bankaloyvi.

Hví ikki hava eina treyt í loyvinum sum ásetur, at tá bátar í bólki 5 eru til fiskiskap á Bankanum, skulu minst tveir verða í fylgi.

Í vár eins væl og undanfarin ár, leitaðu nógvir fullriknir útróðrarbátar heilt sunnan úr Suðuroynni og Sandoynni til Eiðis, Fuglafjarðar, Klaksvíkar og aðrastaðni at royna eydnuna á Norðhavinum. Neyvan nakrantíð í nýggjari tíð hava snellubátarnir fingið so lítið burturúr várfiskiskapinum sum í ár. Nógvir av hesum útróðrarmonnum seta nú álit sítt til tað, sum fiskast kann hesar dagarnar á Bankanum.

Hesir spurningar verða ikki settir fyri at minka um dagatalið hjá bólki 4, tí eg eri onga løtu í iva um, at ásetingin at loyva bátunum hægri dagatal, um teir velja at royna við snellu heldur enn línu, er skilagóð og lættir um veiðutrýstið. Men mín spurningur er framhaldandi, hví tillutaðir fiskidagar hjá bátum, ið royna á sama øki við sama snellureiðskapi ikki skal gerast upp á sama hátt.

# Til 125 ára hátíðargudstænastu fyri Fishermen's Mission

Tíðin í Hetlandi varð væl nýtt hendan túrin, stjórnin í Fiskimannafelagnum var á vitjan. Farið var eisini í kirkju í felagsørindum!

RNMDSF
ROYAL NATIONAL MISSION TO DEEP SEA FISHERMEN



Uttan fyri kirkjuna. Fríðrik t.v. saman við umboðum fyri Fishermen's Mission.

Meðan vit hava eina sjómansmissión, hava bretar tað tey kalla Royal National Mission to Deep Sea Fishermen, sum serliga tænir fiskimonnum.

Orsøkin til kirkjugongdina var, at júst í hesum døgum eru 125 ár liðin, síðani henda missiónin varð sett á stovn, og hetta varð hátíðarhildið í kirkjum á støðum, har missiónin virkar. Í Lerwick varð hon hildin í skotsku kirkjuni, sum eitur St. Colomba's Church.

Gudstænastan var merkt av degnum. Sangirnir, ið vórðu sungnir, høvdu innihald, sum hevði við sjógvin at gera. Ein var tann í Føroyum kendi sangurin: "Heldur akker títt...".Talarin var eisini umboð frá missiónini, sum var komin úr Keelkel í Írlandi í hesum sambandi. Hansara tala var eisini serliga merkt av hátíðardegnum. Umboðið fyri missiónina í Lerwick átti eisini sín part av gudstænastuni við at tosa til børnini, sum vóru í kirkjuni. Hann nýtti signalfløgg sum mynd um eina trygga sigling yvir lívsins hav.

Aftan á gudstænastuna nýttu umboðini fyri FF høvið til at heilsa upp á umboðini fyri missiónina, og vóru tey biðin um at heilsa heima.




*Forsíðan av sangblaðnum hjá Fishermen's Mission.*

### Søgan aftanfyri

Forsøgan til fiskimannamissiónina er tann, at Ebenezer J. Mather kom umborð á sluppir, sum fiskaðu á Dogger Bank. Hann var skakaður av at síggja tey vilkor, sum fiskimenn arbeiddu undir. Her var talan um vánaligar og niðrandi umstøður og útnyttan av fiskimonnum. Úrslitið varð eisini, at teir javnan komu til skaða umborð uttan at nøkur serlig hjálp fekst.

Hetta førdi til, at Mather stovnaði Fishermen's Mission. Fyrsta stigið var at fáa eitt missiónsskip "Bethel Ship" við lækna og presti umborð eins og útgerð, sum fiskimenn høvdu brúk fyri sum sigldi millum fiskivinnuhavnirnar. Dømi um hetta vóru heit klæði, lesnaður, medisinkista, bíbliur og tubakk! Síðani vóru gudstænastur hildnar, har "Bethel Ship" kom í havn.

Men annars er endamálið hjá missiónina at virka fyri allar fiskimenn uttan mun til trúgv. Her er bæði talan um andaliga og tímiliga hjálp.

Síðan vórðu tey fyrstu sjómansheimini bygd, har fiskimenn kundu koma, tá teir vóru í landi.

Hetta kom ikki minst væl við undir krígnum, tá manningar komu til lands av søktum skipum við sín bera kropp. Tá kom tað væl við at koma til sítt "egna" heim, har hond varð tikin um teir.

Missiónin hevur nógvar tænastur. Ein av teimum er at skipa fyri minningargudstænastum fyri teir fiskimenn, sum fingu eina váta grøv, soleiðis at tey avvarðandi kunnu minnast aftur á nakað sum líkist eini jarðarferð. Hetta ger tað lættari hjá teimum eftirsitandi at liva víðari.

Missiónin ger eisini eitt stórt vælferðararbeiði fyri brekaðar, gamlar og uppilagstar fiskimenn. Ofta er eisini boð eftir missiónini, tá trupulleikar eru, sum viðkomandi fiskimenn og teirra avvarðandi ikki makta.

Missiónin er umboðað í 70 havnum kring alt Bretland, og ætlanir eru um enn størri virksemi. Mett verður, at fiskiskapur er framvegis ein so vandamikil vinna, at tørvur er á missiónini sum stuðul hjá fiskimonnum.



St. Columba's Church, har hátíðargudstænastan varð hildin.

### Í Hetlandi í nærum 100 ár

Missiónin kom til Hetlands í 1907, og næsta ár kunnu teir so hátíðarhalda 100 ára dagin fyri hesa hending. Í Lerwick hevur eisini verið eitt sjómansheim tætt við havnina í miðbýnum, hagar fiskimenn kundu koma – bæði at gista og at fáa sær ein bita. Men her er hent tað sama sum í Havn. Við teimum góðu samferðslumøguleikunum hava fiskimenn ikki longur brúk fyri einum staði at gista.

Teir sleppa nærum altíð til hús sama dag. Tí er heimið eins og í Havn selt. Men framvegis er tó missiónsvirksemi millum fiskimenn í Hetlandi.

Tað var hugnaligt at fáa hendan partin av virkseminum fyri fiskimenn við á ferðini. Um onkur vil vita meira um ensku fiskimannamissiónina ber til at fara inn á heimasíðuna: **www.fishermensmission.org.uk**

**Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá**

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
**FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945**

**MAN B&W Diesel A/S**

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

## Lívssøgan um Júst í Túni í bók

Fyri 50 árum síðani:

# Við Atlantsfarinum í Nýfundlandi

10. mai í ár eru 50 ár síðani tann tiltikna túrin hjá skiparanum Júst í Túni vestur um hav til Nýfundland. Júst og manning hansara við Atlantsfarinum løgdu á hesum túrinum grundarlag undir slóðbrótandi línufiskiskap við Flemish Kap. Hesin fjarfiskiskapur var í fleiri ár útvið 20 prosent av føroyska fiskiskapinum.

Nógv er longu skrivað og fortalt um hendan túrin, men í eini bók um Júst í Túni, sum ætlandi kemur út seinni í ár, hevur journalisturin og høvundurin Helgi Jacobsen leita nógv nýtt og forvitnisligt fram frá hesum søguliga túri.



*Á royndarveiðu í Eysturgrønlandi. F.v.: Andrias í Túni, sonur Júst, Hjalti í Jákupsstovu og Jákup Sverri Joensen.*



*Nakrir av manningini á Atlantsfarinum í 1956.*



*Júst saman við manningini á fyrsta túrini hjá Bresti í Nýfundlandi í 1957.*

Tað mundi vera við enskum trolarum, at føroyingar av fyrstan tíð royndu Nýfundlandsbankarnar og føroyingar vistu tí um, at stórt fiskiríkidømi var á hesum leiðum.

Men føroyingar høvdu ikki havt nakra veruliga fiskiveiðu í Nýfundlandi, síðani Kvívíks-Tummas í 1922 gjørdi eina roynd við skonnartini Rosenhjem.

Atlantsfarið var nýbygningur frá Fredrikssund í Danmark og kom til Klaksvíkar á vári 1936. Joen Isaksen og J. F. Kjølbro áttu hvør sína helvt í skipinum.

Men tá Joen Isaksen doyði í 1948, bara 51 ára gamal, keypti einkjan Anna Katrina Isaksen, partin hjá Kjølbro og reiddi síðani skipið út sjálv í nøkur ár.

Anna gjørdi Atlantsfarið út til Júst í Túni fór við í 1953, tá skipið var leigað til Poul Hansen í Havn.

### Skipsboð í januar

Osvald Sivertsen úr Norðdepli, sum var við hendan túrin, sigur at teir fingu skipsboð longu í januar. Tað hildu teir vera tíðliga at fara við toskagørnum til Íslands, tí garnatíðin plagdi ikki at byrja fyrr enn í mars.

Men so fingu teir at vita, at teir skuldu ein línutúr til Íslands fyrst. Teir fóru av Klaksvík 29. januar og royndu út av Jøklunum á Vesturlandinum. Júst hevði hoyrt um at íslendingar á hesi leiðini høvdu fingið nógvan fisk.

Osvald sigur, at tað viðraði illa til veður, men kortini fingu teir 450 skippund.

"Tað minnist eg so væl, tí Atlantsfarið hevði KG 452 og tann túrin vigaði tað akkurát 452 skippund. Vit vóru heima aftur í mars og gjørdu skjótt av og fóru yvir á Suðurlandið við toskagørnum, sum vit plagdu. Vit gjørdu ein óvanliga góðan túr. Vit royndu akkurát ein mánaða í góðum veðri og fingu stív 500 skippund.

So gjørdu vit klárt at fara nýggjan túr til Grønlands. Júst hevði lisið í einum fiskivinnublaði um góðan fiskiskap í Nýfundlandi og eg minnist, hvussu spentur Júst var at gera eina roynd at fara til Nýfundland," greiðir Osvald Sivertsen frá.

### Drúgv ferð og krím

Eftir garnatúrin á Suðurlandinum fór Atlantsfarið 10. mai fyrst til Grønlands. Ferðin varð drúgv, 11 samdøgur, tí illveður var vestaneftir. Og ikki meira enn komnir um Hvarvið saltaði asiatiskt krím manningina niður, so byrjanin var trupul.

Jógvan Isaksen, sonur Joen og Onnu Isaksen, var stýrimaður hendan túrin og minnist, hvussu illa teir vóru fyri av kríminum. Hetta var fyrsta árið, at asiakrímið gekk í Norðureuropa.

"Tað var sum krút. Vit vóru ikki meira enn komnir á Kappan, tá teir fyrstu løgdust. So byrjaðu vit at fiska, men tað var einki at snakka um. Tann seinasta dagin vóru bara tríggir á dekkinum, so har var einki at gera uttan at royna at fáa línuna inn. Fiskin goggaðu vit bara av við rulluna og tveittu útaftur, tí eingin var at reinsa fiskin", sigur Jógvan Isaksen.

Atlantsfarið kom heldur seint til Grønlands hetta árið og tí vistu teir, at tað fór at knípa at fáa uppí við línuni. Í hálvanannan mánað fekk Atlantfarið bara umleið 100 tons og tá hevði mangur skipari slitið túrin og siglt heim. Men Júst vildi tað øðrvísi og tað var nú, at hann tók ta endaligu avgerðina av fara til Nýfundlands.

Ein dagin, teir løgu útfyri Kokoyggjunum, komu teir framvið einari av hesum stóru portugisisku doriuskonnartunum. Portugisar vóru sum kunnugt vælkendir í Nýfundlandi og høvdu roynt har í øldir.

Jógvan og Júst fóru ein dagin umborð á eina av hesum skonnartunum at fregnast. Teir fingu eitt kort yvir bankarnar og skiparin var so beinasamur, at hann dagfesti í kortið, hvørja ársins tíð, best var at royna á teimum ávísu bankunum. Hann nevndi millum annað sunnara kant á Grand Bank og Funkoynna.

### Gera klárt til Nýfundland

So fóru teir inn í Føroyingahavnina at halda skipsráð um ætlanina at fara til Nýfundlands. Manningin var í góðum árum, so har vóru eingir trupulleikar. Skiparin gav teimum lyfti um, at teir skuldu sleppa í land ein dag í Nýfundlandi, so teir kundu prógva, at teir høvdu verið í Nýfundlandi.

So at bunkra og surraðu fleiri føt við olju fram við lúnningini. Í Føroyingahavnini royndi Júst einaferð enn at yvirtala aðrar skiparar um at koma við sær vestureftir undan fiskaloysinum í Grønlandi. Men har var framvegis eingin áhugi.

At lurta eftir frásøgumonnum sum Jógvani Isaksen og Osvaldi Sivertsen, er sum at verða førdur inn í ein ævintýrheim. Flestu av skipsmanningini hava sínar søgur at fortelja og uttan at keðast er tilfar at lesa bara frá hesum eina túrinum sum uppí ein heilan leyp.

Leiðin suðureftir var 900 fjórðingar og tók seks samdøgur. Einki land at hóma, bara bláa hav. Onkur av manningini hevur sagt, at lagið tá var einki serligt umborð. Men eingin gav ilt av sær, so tað kom til kennar millum hinar.

Ferðin var ikki heilt vandaleys. Ísfjøll so stór sum hálv Lítla Dímun og svart í toku hvønn tann einasta dag. Hetta var á nøkunlunda somu farleið, sum Titanic á sinni rendi á eitt ísfjall og sakk.

Atlantsfarið hevði ongan radara og bara eitt skallut ekkolodd og ein 15-watts Kopran sendara frá 1936. Á hesi leiðini fingu teir tí hvørki samband við Grønland ella Nýfundland.

### Brenna í fisk

Tá teir hildu seg vera komnar á fiskileið við Funkoynna tann fyrsta dagin eftir middag, settu teir 48 stampar, sum teir høvdu klárar.

Nógv stóð á monnum, sum høvdu lagt so nógv fyri. Júst hevur sagt, at hevði hann verið veikur av sær tá, hevði hann svímað tvær ferðir, tá teir fóru at draga línuna innaftur.

Dreggið kemur at borðið og teir byrjað at draga fyrsta stampin. Men har var einki á. Ikki ein stertur. Hvørt tað einasta agn kom aftur. So draga teir stamp nummar tvey, men har var sama skili. Allir fóru ristandi á høvdinum niður í lugarið.

Einar Jacobsen í Syðradali stóð við rulluna. Júst og Jógvan stóðu í stýrihúsinum og sóu eitt sindur betur. Nú rópar Jógvan á Einar, at nú kom ein fiskur. Og hetta var ikki nakar smáfiskur, men ein av teimum størstu toskunum.

So gekk ein góð løta til næsti fiskurin kom upp í vatnskorpuna. Jógvan rópar aftur á Einar, at nú kom fiskur nummar tvey. So bleiv tættari millum fiskarnar og at enda slitnaði ikki sundur, so nógv var á. Og hvør maður aftur á dekkinum.

Orsøkin til at teir einki høvdu fingið á teir fyrstu stamparnar var, at teir høvdu sett á tindar á botninum. Tá teir settu aðru ferð um kvøldið, skoyttu teir eitt stykki uppí uppstandararnar og tá var í lagi. Teir høvdu sild til agn og fingu 30-40 fiskar uppá stampin.

Har var rokfiskiskapur. Osvald Sivertsen sigur, at fiskurin var so stórur, at rullan kláraði ikki at draga hann upp úr sjónum og inn á dekkið. Teir máttu tí rigga stórar hakar til at hiva toskarnar upp við.

### Í Bonavista

Tá teir høvdu roynt í átta dagar, var einki agn eftir. Nú vóru góð ráð dýr, tí eingin peningur var á skipinum at keypa meira útgerð fyri. Teir kundu tí valt at siglt heim, men enn var skipið ikki heilt fult.

"Tað var ein sunnudag", hevur Júst greitt frá. "Vit fóru at sigla spakuliga inn til eitt lítið pláss í Nýfundlandi, sum eitur Bonavista.

Eingin føroyingur hevði verið verið har áður og nýfundlendarar undraðust á hesar fremmandu menninar.

Nógvar góðar søgur eru frá vitjanini hendan sunnudagin í Bonavista. Teir máttu lata eina nýggja byrsu, fleiri boyur og eitt urð fyri at fáa 1400 pund av høgguslokki

So hildu teir fram við fiskiskapinum. Teir tíggju dagarnar, teir fiskaðu í Nýfundlandi, fingu teir 300 skippund ella eini 50 tons. Teir sigldu heim fullfermdir 27. juli.

Fyrsti túrurin hjá Atlantsfarinum vardi í tríggjar mánaðar, men 29 dagar vóru farnir til sigling. Netto landingarvirðið hjá Atlantsfarinum hendan túrin var 153.000 krónur og manningarparturin lá um 2.300 krónur.

### Eigur nakar tilfar?

Helgi Jacobsen sigur, at hann heldur enn fegin vil hava tilfar um Júst í Túni og alt tað, hann hevur fingist við, serliga í fiskiskapi, sildaveiðu og alingini. Fleiri hava longu verið beinasom við myndum, men rúm er fyri nógvum afturat.

Frásøgn:

**At taka úr blaðnum**

Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum

# Ein grønlandsferð í 1890

Osmund Joensen úr Sandavági hitti 89 ára gamla konu í Slagelse. Hon hevði funnið nøkur skjøl, sum abbi til mann hennara hevði skrivað, m.a. "En Grønlandsrejse"frá 1890. Hon helt, at tað kundi vera stuttligt hjá Osmundi at lesa, tí hann hevði verið í Grønlandi nakrar ferðir. Osmund hevur so týtt hesa frásøgn til føroyskt. Eisini var ein reglugerð fyri teir, sum arbeiddu í kryolitnáminum í Ivigtut, men hon verður endurgivin á donskum.

Vit høvdu undan jólum eina frásøgn úr Ivigtut. Tí kann henda frásøgn vera av áhuga, tí ferðin er júst til Ivigtut. Frásøgnin er skrivað av einum Jens Nielsen. Tað finst bert ein mynd í samband við sjálva greinina, og hon er av skipinum. Tær myndir vit annars brúka eru tí úr Ivigtut, hagar skipið er á veg.



*"Fox".*




*Kortið vísir Suðurgrønland, og ber her til at síggja, at Ivigtut er ein av sunnastu bygdunum í Grønlandi, beint norðanfyri Julianehåb.*

Fríggjadagin tann 28. mars 1890 kl. 9 fyrrapartin møttu vit, tilsamans 65 mans, á skrivstovuni hjá Kryolitfelagnum til at mynstra sum grønlandsfararar. Vit fingu 60 krónur hvør í forskot, sum vit kundu keypa madrassir, teppir og annað, ið vit høvdu fyri neyðini til ferðina.Tá eg hevði fingið sáttmálan og peningin, og hevði keypt tað, mær tørvaði, fór eg umborð á guvuskipið "Fox", ið skuldi flyta 49 mans til Ivigtut. Ein maður møtti ikki upp, hann hvarv tá hann hevði fingið tær 60 krónurnar, so vit vóru bert 48. Hinir 16 menninir skuldu fara við barkini "Thetis".

Áðrenn eg byrji frásøgnina um ferðina, kundi verið áhugavert at fingið eitt sindur at vita um "Fox" og manning hennara. Hann, ið ongantíð hevur sæð "Fox", heldur kanska, at hetta má vera rættiliga stórt skip, tá tað skal fara eina so hættisliga ferð, men so er ikki. Hon er bert 122 føtur long, 23 fót breið og 12 fót djúp, alt enskt mát. Hon er trímastrað, skonnartriggað við einum 40 hesta hjálpimotori, ið skuldi klára 8 míl um vaktina. Skipið er ógvuliga sterkt bygt og gronin sær út sum ein meitil, so hon kann troka seg gjøgnum ísin, bert tað er eitt lítið glopp á. Fyri at kunna tola harða trýstið av ísinum er hon garnerað (kløðd innan) við einum lag av tunduri. Hon er bygd 1856 í Onglandi sum marglætisskip (lystyacht), men síðan seld til grønlandsfarara og rættiliga nógv styrkt. Yvirmenn á "Fox" eru Olsen, kapteynur, 2 stýrimenn og ein maskinmeistari. Hin manningin er: 2 fýrbøtarar, 2 matrósar, 1 lættmatrósur og 2 ungmenn.

Tann 29. mars skuldu vit allir vera umborð í seinasta lagi á middegi, so vit høvdu nóg mikið at gera fyrrapartin við at fáa viðførið umborð.Tá klokkan var vorðin 11 vóru so gott sum allir komnir umborð og teir flestu við einum "ordiligum hivara". Á bryggjuni var alt ein hurlivasi, har lógu teppir, madrassir og skrín slongd hvørt um annað. Men við hjálp frá hvørjum øðrum var skjótt alt komið inn á dekkið.

Tá klokkan sló 12 vóru allir á dekkinum og bíðaðu eftir at loyst skuldi verða. Klokkan eitt sigldi "Thetis" fram við okkum, tað var væl av vindi, so hon kláraði seg sjálv út úr innaru havnini. Vit róptu eitt rungandi hurrá og ynsktu góða ferð. Tá klokkan var tvey byrjaði "Fox" at lætta sær á, og vit gliðu spakuliga út á Sundið.

Á brúnni vóru nøkur konufólk eftir, sum høvdu fylgt teirra trúlovaðu umborð. Eg sá hvussu syrgnar tær vóru. Hetta mundi vera ein tung løta hjá teimum, tí kanska var hetta tað seinasta farvæl og hvør veit, um ikki onkur mamma stóð eftir?

Av manningini var eingin so syrgin, tí vit fóru við tí í huga at vera líka so raskir, tá vit komu aftur til Keypmannahavnar, sum nú vit fóru avstað. Skjótt vóru vit komnir út um, har vit ankraðu fyri náttina. Nú kundi býarlarmurin ikki ørkymla okkum og vit fingu stundir at gera, hvat vit vildu og nóg mikið var at taka hond í. Fyrst og fremst var at gera koyggjurnar klárar og semjast um, hvør skuldi liggja innast og uttast, tí tveir mans vóru um hvørja koyggju, sum vóru smíðaðar í báðum borðum á skipinum. Síðan var at fáa skrínini niður í lugarið og seta tey so at gongt var ímillum og surra alt væl, so einki skuldi "rósa", tá skipið fór at rulla. Umsíðir kundu vit "tørna inn". Nógvir vóru, sum ongantíð fyrr høvdu sovið umborð á einum skipið, og hesa náttina bleiv heldur ikki nógvur svøvnur, tí her var so nógv, sum gjørdi okkum ónáðir. Eitt var at skipið livdi nokk so fitt og so tann ósunna luftin, ið var her niðri í hesum skýmliga lugarinum. Og fyri at gera tað upp aftur verri hingu tvær lýsilampur og osaðu, so longu fyrstu náttina vóru nakrir, sum fingu sjóverk bara av tí ringa luktinum.

Sunnudagin tann 30. mars skuldu vit so byrja túrin til Grønlands. Fyrrapartin blivu vaktirnar settar, og manntal hildið fyri at kanna, um allir vóru umborð. Ein maður vantaði í, og hóast boð vórðu send í land eftir honum fleiri ferðir, kom hann ikki, og tessvegna blivu vit seinkaðir til út ímóti middegi. Tá teir til seinast komu við boðum um at hann ikki var at finna, rópti skiparin, at nú kundu vit ikki bíða longur og gav boð um, at hála



*Útvinningin av kryolit byrjaði í Ivigtut í 1854. Henda skipamyndin frá 1898 gevur eina ábending um virksemið.*

*Framhald á næstu síðu*

akkerið upp. Og nú varði ikki leingi, til akkerið var á borði og vit sigldu.

## Lagt verður frá landi

Nú vóru allir menn oman dekks og hugdu inn yvir býin, kanska fyri seinastu ferð.

Skjótt hvarv býurin fyri eygum okkara og vit nærkaðust Helsingør. Tað var væl av vindi av útnyrðingi, so sjógvur fór at skola inn á dekkið. Samstundis byrjaði sjóverkurin, men serstakliga var tað ein maður, ið hevði tað ringt, og hann kom ikki fyri seg aftur, fyrr enn langt eftir at vit vóru komnir til Grønlands.

Tá vit komu til Helsingør, ankraðu vit og settu loðsin av. Vindurin vaks í hvørjum, og um tað var tí vit blivu liggjandi um náttina, veit eg ikki. Út móti morgni makaði hann vindin, og tá klokkan var fýra tann 31., lættu vit akkerið og sigldu út í Kattegat við fullari ferð á maskinuni. Her var gaman at sigla, næstan dýrd í sjónum, so ein keddist ikki av at standa á dekkinum og eygleiða alla ta skipaferðslu, sum var í Kattegat og gekk í ymsar ættir. Men tað góða er ofta skjótt eftir seg, og tá vit vóru farnir framvið eystan fyri Anholt køvdi hann av í mjørka, sum vit ikki komu úr aftur fyrr enn seint um kvøldið. Tokulúðurin gekk alla tíðina við teim fyrisettu millumbilunum og mær tyktist tað óhugnaligt at sigla soleiðis, meira í blindum enn á kolasvartari nátt, tí tá síggjast í hvussu er siglingarljósini

Meðan vit soleiðis sigldu, spurdi eg, sum so mangir aðrir, yvirmenninar, hvussu langt var eftir til Skagen. Summir søgdu eitt, aðrir eitt annað, so vit gjørdust einki klókari av tí. Umsíðir høvdu teir logið so ofta fyri okkum, at vit trúðu teimum ikki, um teir onkuntíð søgdu sannleikan. Eg, sum mangir av mínum skipsfeløgum, hevði hug at síggja Skagen, og tessvegna vóru vit nógvir á dekkinum og hildu útkikk. Tá klokkan var ellivu um kvøldið og eg gekk aftur og fram á dekkinum, sá eg vitan á Skagen um bakborð. Eg rópti niður í kappan, at vit sóu vitan framman um bakborð, og teir, sum ikki vóru lagstir, komu á dekkið fyri at síggja landið men til fánýtis, sjálvt um mánalýsi var, sást einki land. Soleiðis var ljósið frá vitanum á Skagen tað seinasta vit sóu av gamla Danmark. Eg hoyrdi fleiri siga, at hevði tað bara verið á heimferðini, vit sóu vitan, teir vóru longu keddir av at sigla. Óslætti Norðsjógvurin og tað stóra Atlantshavið tyktist teimum vera eitt stórt dýpi, sum ikki var komandi um, so teir ynsktu seg longu heima aftur. Tann ið hugsar soleiðis á sjónum, er ikki mikið verdur, hann verður ringur av sjóverki og líkasælur fyri øllum.

Tá eg vaknaði um morgunin tann 1. apríl, var fyrsta ljóðið, eg hoyrdi, tuflurnar, sum róskaðu aftur og fram á dúrkinum. Vindurin var nógv vaksin síðan á midnátt og hevði øst Norðsjógvin upp, har vit nú vóru staddir. Eg slapp mær skjótt í klæðini og upp á dekkið. Á tann vakra sjón, ið kom mær fyri eygu, tey brøttu norsku fjøllini um stýriborð. Í hesi løtu gloymdi eg, at eg var staddur um borð í einum lítlum skipi á tí uppøsta havinum. Einasta hugsan mín var at sammeta Noreg við Grønland.

Nú, tá eg havi sæð bæði londini, kann eg av sonnum siga, at Noreg er tað vakrasta, fjøllini har eru í meðal ikki so høg, sum tey grønlendsku. Dalar og fjallalíðir í Noregi eru, so langt sum eygað røkkur, avvaksin við trøum og grasi, og síðan eg kom til Ivigtut havi eg tosað við norskar sjómenn, sum siga, at soleiðis er tað um alt landið.

Í Grønlandi er púra bert frá fjalli til fjøru.

## Fingu illveður og síðan logn

Vindurin vaks í heilum, so allan fyrrapartin hildu vit fram við norsku strondini, til skiparin nakað út á seinnapartin setti kósina úteftir. Hann kendi Norðsjógvin og visti, at tað nyttaði einki at sigla fram við landi og bíða eftir góðum veðri. Vindurin vaks bara meir og meir og óslættari bleiv í hvørjum.

Alduhæddin var tó ikki so øgilig, men tær brutu so harðliga móti skipinum, at ein skuldi trú, tað fór í knús. Hon rendi fleiri ferðir gronina undir, so sjógvurin skolaði aftur eftir dekkinum. Sum tað sá út í tí løtuni, kundu vit vænta okkum eina harðliga nátt, men hóast tað sær svart út, kann broyting koma í, tí út á náttina makaði hann vindin og um morgunin stilti hann av.

Út á fyrrapartin 2. apríl bleiv blikalogn og slætt sum á gólvinum. Ein skuldi trúð, tað var ógjørligt at sjógvurin kundi leggja seg so skjótt. Eg havi altíð hoyrt at sjógvurin hevur 3 dagar um at leggja seg aftaná ein harðan storm, men tað er ikki heilt beint, her tók tað bert ein hálvan dag, kanska tí at hann skifti ætt og vindurin javnaði aldurnar?

Hendan dagin leið væl eftir, vit sigldu 8 míl um vaktina við maskinorkuni, framman undan høvdu vit bert klárað 3,5 míl, men tá var hann so gott sum beint ímóti.

Um náttina vaks hann aftur vindin, og um morgunin 3. apríl settu vit øll segl, hetta var fyrsti dagur, vit høvdu seglini uppi og vit høvdu góðan vind aftan tvøran so tað gekk strúkandi. Men sjáldan heldur ættin sær í rúmum sjógvi, so vit noyddust at hála skjøtini inn, og út á seinnapartin sigldu vit neyvan (by the wind). So var tað góða av á hesum sinni, seglini vórðu bjargað og maskinan mátti gera nyttu einsamøll. Vindurin var ikki so nógvur nú, so tað gekk bara hampuliga.

## Gjøgnum holið

Um náttina millum 3. og 4. apríl fóru vit gjøgnum "Holið" millum Hetland og Orknoyar, men tað einasta, vit sóu, var vitin á Fair Isle um bakborð. Aftan á midnátt vaks vindurin "by the wind" og um morgunin, langafríggjadag, tann 4. apríl, vóru vit komnir í Atlantshavið. Frá morgninum av sást skilliga, at hetta fór at verða ein baldrutur langafríggjadagur, tí stormurin vaks, so tað var ógjørligt at hava segl uppi.

Maskinan arbeiddi tað, hon var ment, men ikki leið um fliðuna og als ikki tann vegin, vit ætlaðu okkum. Aldurnar sóust ájavnt við góðsið, springarar lupu úr einari aldu og inn í ta næstu, og másarnir flugu í flokkum óhugnaliga skríggjandi. Eg tveitti fleiri kjøtbitar yvir borð til teirra og stuttligt var at



Her verður kryolit lossað umborð í 1906.










Grønlendskir peningaseðlar frá 1803.



Soleiðis sær kryolit út.



Kryolitmina í 1889.

Framhald á síðu 15

# Norðoyatunnilin pf.

**takkar samstarvsfelagum fyri gott samstarv og dygdargott arbeiði**

Entreprenørur fyri tunnil og veg
**Føroya Konsortiið I/S**

BT Byggitek · NCC Construction as · J & K Petersen pf.

Projektering, fakeftirlit og byggileiðsla
Landsbyggifelagið pf.

Eftirlit vegna Landstýrið fyri tunnil
Landsverk

Jarðfrøðilig ráðgeving
Jarðfeingi

Teknisk ráðgeving og útbjóðingartilfar fyri tunnil
Norconsult AS

Byggiharraráðgeving og jarðfrøði/tøkni fyri tunnil
Sweco Grøner

Byggiharri og projektleiðsla

NORÐOYATUNNILIN

Norðoyatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postsmoga 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Faks 350201 · www.tunnil.fo

www.sansir.fo


# Fiskimenninir vóru úr Mikladali

Menninir á hesi myndini vóru allir úr Mikladali og eru frá vinstru: Petur Martin Glerfoss (f. 1908), Absalon Østerø (f. 1911) og Petur Petersen (f. 1914).

Petur Martin og Absalon vóru svágrar, meðan Petur Martin og Petur vóru systkinabørn.

Á myndini, sum er tikin inni hjá Fjallheim í Klaksvík, eru teir um 20 ára aldur.







Altjóða góðkend útbúgving til skipara og skipsførara, sum gevur vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim.
Føroya Sjómannaskúli er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina góða og áhugaverda.

**Skipsførari**
Skipsføraraútbúgvingin tekur 3 ár, 3 semestur til skipara og síðani 3 semestur til skipsførara. Skúlin byrjar 7. august 2006.

**Skipari**
Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara. Skúlin byrjar 7. august 2006.

Næmingar verða tiknir inn til báðar útbúgvingarnar 2 ferðir um árið.

Tilmeldingarskjal fæst við at ringja til skúlan og á heimasíðu okkara.

*Útbúgvingarnar á Føroya Sjómannaskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.*

Føroya Sjómansskúli
Maritime College
Nóatún 2, Postboks 104, 110 Tórshavn
Tel 35 75 00, Fax 35 75 02,farnav@farnav.fo, www.farnav.fo




Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta, hægri yrkisútbúgving, sum kann fáast í Føroyum. Hon gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og ikki minst á landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Einini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkur.
Útbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

**Maskinmeistari**
Maskinmeistaraútbúgvingin tekur 3 ár.
Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið. Skúlin byrjar 7. august 2006.

**Maskinist**
Maskinistútbúgvingin tekur 9 mánaðar.
Upptøka til maskinistútbúgvingina er einaferð um árið.
Maskinistútbúgvingin byrjar 7. august 2006.

Hevur tú hug at gerast maskinmeistari ella maskinistur, so kanst tú seta teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaðnum.
Ring, send eitt brøv, ein teldupost ella far inn á okkara heimasíðu - www.farnav.fo, har tú finnur umsóknarblað.

*Útbúgvingarnar á Maskinmeistaraskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.*

MASKINMEISTARASKÚLIN
Undir krákugjógv 5,
110 Tórshavn
Tel 350 250, Fax 350 251

Whalsay:

# Miðstøðin fyri uppsjóvarflotan í Hetlandi

Á ferðini í Hetlandi hevði sendinevndin hjá FF hug at vitja eina fiskivinnubygd í Hetlandi. Valið var rættiliga lætt, nevniliga Whalsay, sum meira enn nøkur onnur bygd í Hetlandi er tengd at fiskiveiðu. Whalsay er nevniliga "høvuðsstaðurin" fyri uppsjóvarflotan, og minnir bæði á hesum og øðrum økjum um Gøtu. Fólkatalið er mestsum tað sama og sjey av teimum átta nótaskipunum í Hetlandi eru heimahoyrandi her.



*Whalsay-bátahavnin.*



*Jose Simpson.*

Tað tekur umleið eina tíma frá Lerwick at koma hagar. Fyrst ein hálvur tími norður eftir við bussi og síðani ein hálvur tími við ferju. Neyðugt varð at leiga eini minibuss, tí fasta bussambandið er sera vánaligt. Men ferjan sigldir eins ofta og Dúgvan til Klaksvíkar, t.v.s. inntil í seinastu viku! Tað er tað almenna í Hetlandi, sum rekur ferjurnar millum oyggjarnar, og tað er stak bíligt at ferðast við teimum. Eisini eru teir so praktiskir, at teir krevja bert gjald annan vegin.

### Uppsjóvarflotin

Whalsay er ein lítil oyggj – at líkna við Nólsoy, 10 km long og tríggjar breið. Høvuðsbygdin er Symbitser, har meginparturin av fólkinum í oynni býr. Fólkatalið liggur um 1100.

John Goodlad hevði avrátt, at vit skuldu hitta tann 78 gamla fiskimannin og reiðaran Magnus Poulsen, tá vit komu hagar. Hann hevur verið næstformaður í fiskimannafelagnum í Hetlandi.

Hann bjóðaði okkum beinanvegin umborð á nótaskipið hjá sær "Serene", og tað heilt serliga var, at hetta skipið júst tá varð selt til Føroyar. Grundgevingin fyri at selja var, at nú var skipið farið at eldast, og skuldi ein fylgja við, var eisini neyðugt, at skipini vóru dagførd alla tíðina.

Hetta málið hevur Magnus eisini livað upp til, tí hetta er tann sjeyndi "Serene", síðani tann fyrsta kom í 1955, tá var hann bert 26 ára gamal.

"Serene" virkaði nú ikki á nakran hátt, sum eitt avoldað skip. Tað er bert 7 ára gamalt, og hetta er eingin aldur fyri eitt skip – ikki í Føroyum í hvussu er.

Skipið virkaði framúr væl útgjørt, og tað stendur ikki á nakran hátt aftan fyri tey nýggju føroysku nótaskipini. Tað tekur eini 2200 tons. Maskinorkan er 10.000 hk, og tað kann lættliga sigla sínar 20 míl.

Eins og her hjá okkum gongst væl hjá nótaflotanum í Hetlandi. Trupulleikin er bert avmarkaðir veiðumøguleikar. Teir hava næstan bara kvotur upp á sild og makrel. Teir hava ongantíð skapt sær søgulig rættindi til at fiska svartkjaft, sum er tað størsta íkastið hjá okkara uppsjóvarflota. Teir eru tískil bert úti í umleið helvtina av árinum. Men henda upp á seg stutta veiðutíðini gevur teimum eitt veiðuvirði uppá 4 mio. pund í 2005. Hetta ber til hjá skipinum og eisini hjá manningini, sum eru 11 umborð í senn – nakað tað sama sum hjá okkara skipum.

### Fiskaðu fyri 70 mio. kr. í tveir mánaðir

Her skal verða skoytt uppí, at størsta nótaskipið í Hetlandi, "Altaire", sum er heimahoyrandi norðalaga í Hetlandi, sum nakað herfyri hevði veitt fyri 7 mio. pund í tveir mánaðir, helst man tað hava verið eftir makreli. Hetta eru øðrvísi ørandi upphæddir, men munurin er, at teir hava svartkjaftakvotu, og teir hava keypt veiðuloyvir frá øðrum skipum. Um hetta skip er at siga, at teir vóru 7 eigarar, men knappliga yvir nátt, høvdu fýra teirra selt sín part til hollendsk áhugamál. Hildið verður, at teir, sum seldu, fingu 3 mio. pund útgoldið í part. Teir nýggju eigararnir hava kortini valt at lata skiparan halda fram, sjálvt um hann var millum teir tríggjar, sum ikki seldu, og er hetta ikki so løgið.

Eigararnir av "Serene" hava roynt at keypa kvotur aðra staðni frá, men tær eru so dýrar, at teir hava hildið aftur. Magnus heldur, at "Serene" er besta nótaskipið í Bretlandi, og sjálvur hevði hann ikki serligan hug at selja. Tað vóru meira teir ungu – synirnir – sum høvdu hug til tess, og tað eru jú teir, sum skulu halda áfram. Tá ið teir so fingu eitt gott tilboð, tóku teir av. Ætlanin er beinan vegin at fara undir at byggja nýtt skip, men tað tekur so sína tíð.

Síðani vóru vit boðin at koma umborð á "Charisma", sum er bygdur í 2003 í Noregi. Versonur Magnus er stýrimaður á hesum skipinum, og var tað stásiligt umborð á "Serene", so var tað ikki minni stásiligt umborð á "Charisma". Støddin var tó nakað tann sama, maskinan var eitt sindur minni, men hevði størri trekkkraft.

Magnus eigur 5 børn, 2 synir og 3 døtur. Higartil hevur Magnus fingið 17 abbabørn. Vit hittu sonin Lennart, sum siglir við "Serene". Hann letur væl at tí at búgva á Whalsay, hóast oyggin má sigast at vera eitt sindur fjarskotin. Hann og konan eiga 4 børn, og tað verður tikið hond um børnini frá almennari síðu heilt frá byrjan við dagrøktarstovnum og skúlum. Somuleiðis verður eisini tikið hond um tey gomlu við einum nútímans ellisheimi. Um skattin sigur hann, at tað er sjálvsagt eftir inntøku. Upptil umleið 12.000 pund í inntøku rinda ongan skatt, 24% verða goldin av inntøkuni upp til £30.000, og síðani er skatturin 40% av inntøkuni omanfyri £30.000.



*Gamla handilshúsið.*

Fiskimenn í Hetlandi fáa ongar skattligar sersømdir, soleiðis sum okkara fiskimenn fáa.

Tað eru tríggir handlar á Whalsay, og sum í eini føroyskari bygd av somu stødd er avmarkað, hvussu nógv ið er at fáa, í hvussu er til konufólkini. Skulu tær út at keypa, so verður farið til Lerwick, og hóast tað tykist sum at alt møguligt er at fáa har, so hendir ta kortini, at tær heldur fara til Aberdeen at keypa inn.

### Útróður og virki

Whalsay hevur eisini ein flota av smærri bátum og roknað verður við, at tað eru umleið 150 fiskimenn tilsamans í oynni. Hetta má roknast at vera nógv í mun til fólkatalið. Her er eisini eitt virki, har eini 70 fólk arbeiða. Tað var upprunaliga bygt sum eitt flakavirki, men nú verður tað nýtt sum laksavirki. Sagt verður, at nakað væl av laksinum, teir arbeiða her, kemur úr Gøtu. Alt hetta merkir, at tað er eitt neyvt samband millum vinnufólk á Whalsay og Føroyum.

Farleiðin til Lerwick tekur ein tíma, og tað eru nøkur fólk, sum búgva á Whalsay men arbeiði Lerwick, her er mest talan um konufólk.

Tað er liviligt á Whalsay. Tey ungu vilja fegin búgva her. Tey byggja sær hús her og sagt verður, at eini húsi kosta frá 100.000 til 200.000 pund, ella nakað tað sama sum í Havn, men nakað nógv meira enn hús í samsvarandi føroyskari bygd.

Magnus gamli hevur nú mest sum lagt frá sær. Hann hevur einar 40 seyðir, sum tað tó ikki er so nógv stríð av, tí hann er úti alt árið. Sum í Føroyum er seyðurin millum húsini um veturin, men á sumri verður hann koyrdur út um bøgarðarnar.

Magnus hevur í hvussu er nóg mikið av kjøti til seg og síni.

Men lívið her er ikki bert fiskur og seyður. Her norðuri finst tann norðasti golfbanin í øllum Bretlandi, har tað verður skipað fyri kappingum. Í sambandi við golfbanan er eisini eitt vælverusentur (Leisure center) við m.ø. svimjihyli og billiard. Hinvegin er ikki nógv gjørt fyri at fáa fólk at gista, og tað er heldur einki gjørt fyri, at fólk kunnu keypa sær ein betri bita her.

### Politiska støðan

Í aðrari grein verður greitt frá politisku viðurskiftunum í Hetlandi.

Whalsay saman við smáoyggjunum – Out Skerries – longur til havs móti eystri við um 100 íbúgvum er eitt valdømi, sum velur ein av teimum 22 limunum í Shetland Islands Counsil. Sitandi umboð er Josie Simpson, sum er fyrrverandi formaður í hetlendska fiskimannafelagnum. Ætlanin var, at vit skuldu hitta hann, tá vit vitjaðu, men hann var burturstaddur í arbeiðsørindum. Hinvegin so hittu vit hann á veg heim við "Norrønu". Hann hevur nevniliga samband við grunnin, sum eigur í Smyril Line, og hann skuldi nú tingast um tær nýggju íløgurnar, sum hava verið upp á tal, at Hetland skal gera í Smyril Line. Josie hevur sitið tryggur í sínum sessi í Counsil uttan mótvalevni til seinasta val. Men teir eru við at umskipa



"Charisma".



"Serene".

ráðið. Skotska parlamentið hevur ásett, at talið av limum skal minkast úr 22 niður í 15.Trý valdømi við einum tingmanni í hvørjum skulu til valið í 2007 sláast saman, og í samlaða nýggja valdøminum skulu nú veljast 2 limur. Tað verða heilt vist fleiri enn tvey valevni, so val verður undir øllum umstøðum, tá valskeiðið gongur út í 2007.



*Magnus Poulsen saman við soni høgrumegin og versoni vinstrumegin.*

Annars er eisini eitt økisráð á Whalsay, sum tekur avgerð í smærri málum og er ráðgevandi fyri hægri myndugleikum. Her er kona Josie Hasel Simpson, formaður.

Josie er annars ein av undangongumonnunum innan nótaveiðu í Hetlandi. Hann var skipari á tí triðja nótaskipinum, sum kom til Hetlands í 1972. Hann fekk eitt nýtt nótaskip í 1980 og hevur havt nýggjari skip síðani. Men nú er hann givin við fiskiskapinum og fæst bert við politikk.



*Klokkan umborð er tann sama sum í teirri fyrstu "Serene" í 1955.*

### Búseting í 4.000 ár

Annars verður sagt, at fólk hava búð á Whalsay í 4.000 ár, og verður hetta prógvað við útgrevstrum av ymiskum slagi.

Fiskivinnan hevur havt avgerandi týdning í fleiri hundrað ár. Tað var saltfiskur, sum var tann stóra vinnan, og øll vinnan var í øldir í hondunum á týskum hanseatiskum keypmonnum. Tað finnast framvegis handilshús frá hesi tíðini. Handilsskip komu higar við øllum møguligum vørum, og tað var ikki sørt av smugling heldur.

Tey, sum ætla sær til Hetlands, eiga heilt vist at fara til Whalsay. Tað tykist sum at vit kanska kundu lært eitt sindur av bygdamenning her eisini.



**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Fisheries and Maritime Affairs



# STJÓRI TIL TILBÚGVINGARSTOVN FØROYA

Fiskimálaráðið hevur gjørt av, at virkisøkini sjóbjarging (MRCC), brunaumsjón og tilbúgving verða løgd í ein stovn. Í hesum sambandi verður søkt eftir stjóra.

Stjórin fer at hava yvirskipaðu ábyrgdina av, at tilbúgvingarøkið undir Fiskimálaráðnum, og samskipanin hesum viðvíkjandi, virkar á ein tryggan hátt.

**Høvuðsuppgávur**
Leiða og samskipa arbeiðið á Tilbúgvingarstovninum, herundir
- at samskipa og greina raðfestingar og verkætlanir og gera meginsetningar millum starvsøkini undir brunaumsjónini, sjóbjargingarstøðini (MRCC) og onnur tilbúgvingarøki
- at seta í verk tilbúgvingarlig menningartiltøk, eitt nú skipaða førleikamenning fyri útinnandi partarnar í tilbúgvingini, í samstarvi við brunaumsjónina og sjóbjargingarstøðina
- at umsita játtanir mótvegis miðfyrisitingini
- at evna til uppskot til lógir og kunngerðir innan tilbúgvingarøkið
- at veita Fiskimálaráðnum ráðgeving í tilbúgvingarmálum
- at samstarva um tvørgangandi uppgávur í Fiskimálaráðnum

**Almenn førleikakrøv**
- Útbúgving frá lærdum háskúla ella útbúgving og royndir, ið kunnu javnsetast við hetta
- Viðkomandi leiðsluroyndir
- Starvsroyndir ella kunnleika til tilbúgvingarøkið
- Góð evni at samskifta, bæði munnliga og skrivliga, á føroysum, donskum og enskum máli
- Góð samstarvsevni og evni at fyriskipa
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokk hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv.

Starvsheitið er stjóri og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran í Fiskimálaráðnum.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin verður Tilbúgvingarstovnur Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu sendast Fiskimálaráðnum, Rógva Reinert, aðalstjóra, Postboks 347, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 14. mai 2006.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rógva Reinert, aðalstjóra, á tel. 353030.

www.fisk.fo

FF-blaðið www.fiskimannafelag.fo
Gerst haldari av FF-blaðnum fyri bert kr. 250,- um árið
Ring 31 15 69 ella send ein t-post til ff-blad@post.olivant.fo



# Søkt verður eftir lærara til Maskinmeistaraskúlan og Føroya Sjómansskúla at byrja 1. august 2006.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi fulltíðarstarv í einum sera góðum umhvørvi, bæði tá tað snýr seg um karmar og samstarv millum leiðslu, lærarar og næmingar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal annaðhvørt:
1) hava útbúgving sum maskinmeistari,
2) í minsta lagi hava 2 ára starvsroyndir sum maskinmeistari og
3) í minsta lagi hava staðið bachelorútbúgving frá hægri lærustovni.

ella:
hava bachelor ella kandidatútbúgving í einari ella fleiri av lærugreinunum, sum geva førleika at undirvísa í lærugreinunum automatión, ellæru, maskinlæru, stødd-, alis- og evnafrøði.

Tað er ein fyrimunur at hava undirvísingarroyndir og at hava námsfrøðiliga útbúgving.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfeløg.

**Umsókn við CV og prógvum verður at senda til:**
Maskinmeistaraskúlan
og Føroya Sjómansskúla
Att. Hans Johannes á Brúgv, stjóri
Postboks 104
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. mai 2006.

KREA.FO · TEL 47 80 80

Maskinmeistaraskúlin og Føroya Sjómansskúli hava fýra útbúgvingar: Skipara, skipsførara, maskinist og maskinmeistara. Skúlin lýkur STCW krøv. Tí eru útbúgvingarnar á altjóða støði og geva arbeiðspláss kring allan heim. Á starvsstovunum finst øll standard nútímans útgerð. Í dag ganga 160 næmingar á skúlanum.

Føroya Sjómansskúli Maritime College
Føroya Sjómansskúli
Nóatún 2, Postboks 104, 110 Tórshavn
Tel 35 75 00, Faks 35 75 02
farnav@farnav.fo, www.farnav.fo

MASKINMEISTARASKÚLIN
Maskinmeistaraskúlin
Undir krákugjógv 5
110 Tórshavn
Tel 350 250, Faks 350 251

FØROYA BRANDSKÚLI
Føroya Brandskúli
við Áir, 420 Hósvík
Tel 422354, Faks 422452
fire-fight@fire-fight.fo, www.fire-fight.fo

*Framhald frá síðu 10*

síggja, hvussu teir bardust um bitarnar og hingu fastir í hvørjum øðrum, so einki sást til kjøtið.

Henda dagin vóru nógvir, ið fingu sjóverk, tað er nú løgið, at sjálvt tann raskasti og frekasti fýrurin ofta er tann ringasti ræðuskíturin á sjónum, og tað havi eg fingið dømi um í dag.

Maðurin, sum var so ógvuliga ringur av sjóverki tann fyrsta dagin, var nú so ringur, at hann ikki kundi ganga upp á dekkið sjálvur, vit máttu bera hann upp, tí fríska luft mátti hann fáa viðhvørt, hann skuldi alla tíðina spýggja, men har var einki, tí hvørki vátt ella turt fekst niður í hann.

Ein skuldi trúð at tað var keðiligt at vera á sjónum í tílíkum veðrið, og tað er tað á ein hátt eisini, men altíð er onkur ímillum, sum roynir at halda fólkið í góðum lag, onkur spælir á harmoniku og aðrir syngja, so gongur tíðin nógv betur, enn um ein fellur í fátt og hugsar, at skipið neyvan fer at klára hesa ferðina; slíkum tonkum skal eg ráða øllum frá, sum skulu sigla, so klárar ein seg nógv betri.



*Ivigtut í 1940. Amerikanarar tóku Grønland undir krígnum. Ein avgerandi orsøk var at fáa bæði sjálvir at fáa hendur á kryolittinum og at forða týskarum at fáa hetta tilfar, sum var so avgerandi fyri krígsídnaðin.*



*Vakurt hevur tað verið.*



*Enn ein mynd úr Ivigut.*

### Styrktu okkum við rom

Um kvøldið góvu teir okkum rom, av tí at veðrið var so strævið. Ymiskt er við náttúru mansins, summir klára seg betur við sjóverkinum, um teir fáa rúsdrekka, meðan aðrir als ikki tola tað, eg kann siga fyri mín part, at eg als ikki toli rúsdrekka á sjónum og tí tørnaði eg inn og lat teir drekka rom, sum høvdu hug til tess. Men einki lív var at vera í koyggjuni, eg mátti halda mær alla tíðina fyri ikki at verða tveittur út á dúrkið. Tá farið var um midnátt orkaði eg ikki at liggja longur, so eymur var eg um allan kroppin av øllum stoytunum, eg hevði fingið. Eg tørnaði so út og lat meg í, tað gekk skjótt, tí í slíkum veðri liggja so gott sum allir í teim mestu klæðunum. Eg fór á dekkið og setti meg á ruffið uppi yvir dampketlinum í læ, har var heitt og gott, so eg gjørdi av at verða sitandi til út móti morgni. Men henda avgerð fekk bráðan enda, tí eg hevði ikki sitið rættiliga leingi, tá eitt brot kom inn yvir brúnna og meg, so eg bleiv á kroppi og mátti niður undir at skifta hvønn tráð. Síðan festi eg mær í pípuna og setti meg at lesa, okkurt skuldi eg hava at stytta mær stundir við, tí í koyggjuni var ikki liggjandi og á dekkinum ikki verandi. Tá leið móti morgni byrjaðu menn at koma úr koyggjunum, so tað var ikki so einsligt longur. Eg segði teimun frá hendingini um náttina, sum stuttleikaði teimum ófført, og sjón fyri søgn fingu teir, tá teir sóu tey vátu klæðini.

### Fingu breyðsuppu til døgurða

Tann 5. var sama veðrið, men hvønn dag upplivir ein okkurt, sum ikki hevur verið fyrr, hendan dagin var tað ein máltíð í ringum sjógvi. Leygardag fingu vit breyðsuppu til døgverða, sum so manga aðra staðni. Vit sótu á dekkinum, tí har var best pláss, hinvegin var tað ógjørligt at sita uttan at halda sær í okkurt, og at halda sær og súpa alt ísenn, bar als ikki til, men hóast alt vardi ikki leingi, til skálirnar vóru tømdar – og næstan allar ísenn. Ein sjógvur breyt so harðliga móti skipssíðuni, at vit allir fóru rósandi eftir dekkinum, nakrir mistu skálirnar og aðrir ikki, men tá vit komu aftur á føtur, høvdu vit oyst hvønn annan undir í breyðsuppu, so tað var ein syrgilig sjón.

Um náttina makaði hann vindin, og tað fór at regna av grimd, tá slætnaði skjótt. Nú vóru vit riknir heilt upp móti Føroyum, onkur vildi vera við, at oyggjarnar sóust, men eg fekk ið hvussu var ikki eyga á tær. Páskamorgum tann 6. var frálíkt veður og slætt í sjónum, púra stilt er ongantíð, altíð eitt sindur av aldu, men eingi brot.

Vit søgdu eisini allir, at "langfredag var en bitter dag, men skøn er påskemorgen", ikki eitt lot, sólin skein so fagurliga og innan fyri tann 2 alin høga skansaklædningin fóru nú fram allir hundakunstir. Um kvøldið varð hildin uppboðssøla av ymiskum lutum, sum vanliga vóru seldir fyri dupult so nógv, sum teir vóru verdir, rom varð eisini latið manningini, sum gjørdi, at teir fingu enn betri hug at bjóða. Gjaldingin skuldi fara fram so skjótt, vit vóru komnir í land í Ivigtut og høvdu fingið pening.

Um náttina vaks hann vindin aftur og annan páskadag var ikki so vakurt. Sum dagurin leið komu fleiri heglingsæl og vindurin vaks alsamt, so tann 8. høvdu vit ein góðan "lensara". Maskinan gekk ikki, og "Fox" sigldi tann dagin 12 míl bara við toppseglunum, tá gekk hon mangan so djúpt, at hon vóð í skúmi, men tað er alt í lagi, bert tað gongur tann vegin ein ætlar sær, so er gaman at sigla.

Náttina millum 8. og 9. fingu vit hann ímóti, so tann 9. komu vit ikki rættiliga langt, tí strævið var at vinna upp ímóti vindi og sjógvi. Tann 10. høvdu vit eisini mótvind, og um náttina vaks hann til storm. Tann 11. fyrrapartin makaði hann vindin og seinnapartin gjørdist rættiliga gott veður. Henda dagin vóru vit komnir á hædd við Ísland, sum var á leið 75 míl norðan fyri okkum.

Tann 12. var frálíkt veður, ja, lotið fylti neyvan seglini, og út á fyrrapartin hómaðu vit ein siglara langt úti í havsbrúnni. Eingi signalir vórðu givin, men skiparin helt, at hann mundi koma úr New Foundlandi og hevði kós móti Íslandi.

Vit vóru allir á dekkinum, tí vit hildu tað vera stuttligt at síggja eitt skip, nú vit høvdu siglt so leingi og ikki sæð annað enn himmal og hav. Ímeðan kom skipið so nær, at vit sóu, at tað var ein tveymastrað skonnart. "Fox" er eitt lítið skip, men hetta var minni. Eg skal í hesum viðfangi siga frá, at tað hendi ikki so sjáldan, at onkur rópti niður í kappan, at skip var í eygsjón. Men tá so allir komu upp, var einki at síggja. So ofta vórðu vit hildnir fyri gjøldur, at vit ikki trúðu tí, men hesaferð vísti tað seg at vera satt.

### Aftur stormur

Náttina millum 12. og 13. brendi hann á við stormi um tólvtíðina, sum menti seg til eina heila orkan, men vardi tó ikki meir enn 4 tímar. Skrínini slitu seg leys og rósaðu borð úr borði saman við øllum tuflunum, so tað var ein ræðuligur larmur. Niður á dúrkið tordu vit ikki at stíga, tí vit kundu vænta at bróta beinini av teim tungu skrínunum. Tann 13. stilti hann av aftur og 14. høvdu vit ein góðan byr við onkrum heglingsæli av og á. 14. og 15. var eisini gott veður.

Náttina millum 16. og 17. vaks hann aftur til hvassan storm, og á middegi tann 17. løgdu vit til. Róðrið bleiv bundið, tá tveir mans ikki kláraðu at halda tí í tí ringa sjónum, ja, brotini vóru so stór, at tey vóru oman fyri skorsteinin. Skrúvað bleiv fyri dampinum og eitt segl sett upp fyri at hon skuldi liggja betur. Tá vit høvdu fingið hana at liggja, tók hon ikki so nógvan sjógv á seg sum áður.

Vit lógu nú bakk til á middegi tann 18. tá fyrst makaði hann vindin. Vit vóru nú riknir ein langan tein suður eftir, móti New Foundlandi. Eitt sum vit vóru bangnir fyri meðan vit soleiðis lógu, var drívísurin, vit vóru komnir á hædd við Kap Farvel og kundu vænta hann nær sum helst. Einhvør kann hugsa sær, at tað er eingin stuttleiki at liggja bakk í bølamyrkri og vita, at ísurin kann vera á kroppinum hvørja løtu.

Á middegi 18. fóru vit aftur at sigla, tá var nógv slætnað og lagið var farið at batna á monnum. Bert tann áðurnevndi maðurin, ið var so sera ringur av sjóverki, var einki glaðari. Hann var nú so ringur, at hann setti ikki beinini undir seg, hann hevði heldur ikki etið bitan teir seinastu 10 dagarnar, bert fingið eitt sindur av heilivági frá læknanum, vit høvdu umborð. Hann lá í koyggjuni og bað, tí hann væntaði ikki at koma livandi frá túrinum og heldur ikki at síggja konu og børn aftur, tí hetta var ein giftur maður. Hann var nú í teirri støðu, at hann var vorðin líkasælur fyri øllum og væntaði ikki at liva leingi afturat og tað hjálpti einki, at vit royndu at ugga hann, tí hann hevði slept vónini.

### Ísur í havsbrúnni

Vit høvdu nú fingið at vita, at tá ísbrúgvin var í havsbrúnni, skygdi tað hvítt í luftini, og tíðliga um morgunin tann 19. vóru vit á dekkinum og skimaðust. Út á fyrrapartin sóu vit tað fyrsta ísstykki, tað var eitt lítið petti, ikki meir enn eina alin í fermát, men vit skuldu kortini allir á dekkið at hyggja at tí. Løtu seinni skygdi hvítt í luftini og tá vistu vit, at ísbrúgvin nærkaðist. Hon kom nærri og nærri, og út á seinnapartin vóru vit henni so nær, at tað sást, at vit ikki sluppu ígjøgnum, hon var so tøtt, at har sást einki

*Framhald á næstu síðu*

glopp. Vit sóu land um Julianehåbsleiðina, men tey høgu fjøllini sóu bert út sum skýggj á luftini, so vit vóru uttan iva langt úr landi. Tað var ógvuliga hugstoytt at síggja land og ikki sleppa inn. Vit hildu áfram at sigla fram við ísbrúnni norðureftir, og tá kvøldið kom, og vit einki glopp høvdu sæð, hildu vit út frá aftur fyri ikki at verða tiknir á bóli av ísinum.

Um morgunin tann 20. hildu vit inn ímóti aftur, men við sama úrsliti. Skiparin helt áfram at sigla norðureftir, tí hann meinti, at brúgvin mátti enda har. – Mesti drívísurin á vesturstrond Grønlands kemur frá eystur-strondini, partvís frá teim stóru jøklunum, sum liggja út móti havinum og so frá Norðuríshavinum. Hann rekur so við streyminum suður við eystur-strondini, runt Kap Farvel og upp í Davisstrætið.

Tá kvøldið kom hildu vit aftur út frá aftur. Til alt held var veðrið so óføra gott, meðan vit vóru so tætt við ísbrúnna, annars kundu vit komið illa fyri.

Um morgunin 21. stýrdu vit aftur móti ísbrúnni, men sama skilið, einki glopp at síggja. Um middagsleiti fór fyrsti stýrimaður upp í mastrina og fekk tá eygað á eitt lítið glopp millum tvey stór ísfjøll, og skiparin stýrdi so tann vegin við lítlari ferð.

"Fox" fekk akkurát gronina inn ímillum tey, gloppið var ikki meir enn einar tvær alin, so tað gekk ikki, men eftir fleiri royndir eydnaðist "Fox" at fáa ísfjøllini at snara sær, so tað bleiv rúmligari. Hetta var ein skýmlig renna at vera komnir í, í bæði borð var ísurin so høgur sum stórmasturin, á øðrum ísfjallinum var ein stórur kneysi, sum hekk inn yvir dekkið. Vit óttaðust fyri, at hetta fór at steðga okkum og at vit blivu fastir, men rigningurin skar kneysan av, so hann datt niður á dekkið, og so í sama viðfangi smeyg "Fox" sær út úr ísinum, júst sum tá ein fiskur smýgur sær úr hondunum á einum. Tað lætti hjá okkum øllum, nú vit vóru slopnir ígjøgnum og fóru at sigla móti Ivigtut. Vit vóru nú 50 míl norðari enn vit skuldu og so langt eygað rakk, var eingin ísur fyri framman. Landið sást betur og betur, so hvørt sum vit nærkaðust, og vit sóu nú týðuliga ísblinkin millum Godthåb og Frederikshåb.

Klokkkan 3 seinnapartin passeraðu vit Frederikshåb og koyrdu flaggið upp og í kikara sóu vit, at teir eisini høvdu flaggið uppi inni á landi. Stutt aftaná sóu vit aftur ís fyri framman. Stýrimaðurin mátti upp aftur at hyggja, men rópti niður til skiparan, at ísurin var ikki tættari, enn at vit væl kundu sigla ígjøgnum. Skiparin rópti aftur, at hann mátti vera vísur í tí, annars máttu vit inn undir land at ankra, tí ikki er gamansleikur at koma í ís á náttartíð.

Tá vit komu til ísin, sum vit kortini sigldu ímóti, var vorðið hálvmyrkt, so ikki var meir enn vit sóu at stýra millum ísstykkini. Teir, sum vóru á vakt, vóru útgjørdir við longum bátshakum, sum teir stungu ísstykkini frá við, so tey ikki skuldu koma fyri skrúvuna, men sum náttin leið, fekk "Fox" fleiri so harðar stoytir, at vit allir fóru um koll, sum vóru vit skotnir. Hetta var ein óhugnalig nátt.

Um morgunin tann 22. tá eg kom á dekkið, vóru vit komnir tætt undir land; tað sá út sum vóru vit ikki meira enn eina snørislongd úr landi. Ísurin var líka nógvur enn, men nú var ljóst, so tað bilti ikki so nógv, og ísstykkini vóru ikki størri enn at "Fox" væl kundi skúgva tey til viks. Út á fyrrapartin sóu vit tveir svartar prikkar langt úti millum ísstykkini, og tá vit komu nærri vóru tað tvær grønlendskar kajakkir. "Fox" legði stilt, og skiparin veittraði grønlendingarnar at borði. Stuttligt var at síggja, hvussu dúgligir teir vóru at brúka hesa lítlu árina, teir høvdu, tí tað galt jú um at koma fyrstur til skipið, tí tann, ið fyrstur var, bleiv tikin umborð sum loðsur. Men hesaferð nýttust teimum ikki at skunda sær, tí skiparin tók teir báðar umborð. Reglarnir vóru, at einki skip mátti sigla í havn í Grønlandi uttan at hava grønlendara umborð, tí um siglt varð á land og eingin grønlendingur var umborð, tók tryggingin ikki við.

Tá vit høvdu fingið teir umborð, fingu vit beinan vegin okkurt forvitnisligt at hyggja eftir, kajakkirnar við øllum veiðiamboðunum vóru sera áhugaverdar, og so grønlendingarnir, hesir smáu menninir við ravnsvørtum hári og myrkum eygum, ið gingu á dekkinum og flentu til allar, sum teir kendu frá fyrr. Teir dugdu eitt sindur av donskum og søgdu skiparanum at Arsukfjørðurin var fullur av ísi, men tó ikki meir enn at teir kundu sigla okkum líka til Ivigtut. Nú gjørdist rættiliga gott lag á monnum, tá vit hoyrdu, at vit sluppu í land sama dag. Koyggjuklæðini blivu skjótt rullaði saman, vit vaskaðu okkum og lótu okkum í frægastu klæðini fyri at síggja hampuligir út, tá vit komu í land. Tær báðar smáu kanónirnar, vit høvdu umborð, blivu hálaðar upp á dekkið og løddar, og tá vit passeraðu Kamikdaliq og júst sóu inn á Ivigtut, góvu vit teimum ta fyrstu heilsanina, sum bleiv svarað aftur úr Ivigtut.

### Endiliga frammi

Vit sóu, hvussu fólk tusti oman á bryggjuna, og umsíðir ankraðu vit og fóru í land tann 22. apríl klokkan 13.30, eftir at hava siglt 750 míl, (uml. 1900 sjómíl) tá langi umvegurin, vit sigldu norðureftir, ikki er íroknaður.



*Julius Thomsen var eitt av skipunum, sum sigldu millum Amerika og Grønland undir krígnum, og sum eisini sigldi til Ivigtut.*



*Her verður arbeitt við handamegi um aldarskiftið.*



*Trongligt hevur verið í minunum.*

# Vedtægt for arbejderne ved Ivigtut Kryolitværk

Af grønlænderne kan indkøbes fisk vildt og mindre syede sager til eget forbrug, hvorimod ingen må indkjøbe til oplag af sådanne sager. At indkjøbe eller tiltuske sig hele sælskind, sælskindsbenklæder, kamikker, bjørneskind, ræveskind, rensdyrskind eller edderdun, er strengt forbudt.

Enhver har lov at fange eller skyde ræve om vinteren, men bør straks anmelde sin fangst enten til bestyreren eller kontrolløren, at han ikke skal blive anset for at være i ulovlig besiddelse af skindet. At afbenytte grønlænderne til at fange eller skyde ræve er ulovligt og forbydes.

Det er ikke mandskabet tilladt at besøge beboede grønlænderpladser som Arsuk eller teltpladserne, ligesom det forbydes i det hele at have omgang med grønlænderne eller grønlænderinderne. Mandskabet forbydes adgang til tjenerindehuset eller sygehuset.

Hverken til grønlænderne eller grønlænderinderne må leveres eller udskænkes brændevin eller spiritus af nogensomhelst art eller under nogetsomhelst påskud.

Til enhver af kryolitbruddets mandskab, der ikke drikker brændevin, vil ingen spiritus blive udleveret, hvorimod enhver efter eget øget ønske kan til vederlag erholde udleveret et pund sukker pr. Pot brændevin.

Ethvert forsøg på at indkøbe eller indføre spiritus ved skibene er strengt forbudt. Finder sligt sted, vil det medføre varernes fortabelse og efter omstændighederne mulktering eller afskedigelse.

Det pålægges enhver at omgås meget forsigtigt med ild og lys, og i den henseende bemærkes det særligt, at intet må hensættes eller ophænges til tørring i nærheden af kakkelovn eller andre ildsteder.

Ved sprængningsarbejder er det strengt forbudt at opbore forsagede miner. Forsøges dette, vil ikke alene vedkommende minører, men tillige enhver, der har arbejdet i nærheden og kunnet forhindre det, blive draget til ansvar.

Det pålægges i det hele enhver at omgås forsigtigt med krudt, såvel sprængkrudt som jagtkrudt, og ved hjemkomsten fra jagtture skulle derfor geværerne enten afskydes eller skuddene udtrækkes, idet der ikke må forekomme ladte geværer på mandskabsstuerne.

Både af hensyn til ildsvåde og til krudt er al tobaksrygning under arbejde utilladelig. Der må ligeledes ikke finde tobaksrygning sted i andre lokaler end de beboede.

På kyststrækningen ved bruddets proviantmagasin, fra tjenerindehuset til prammepladsen, må ingen skydning finde sted fra 1. april til 1. september må der ikke jages på fjældet i det hele, og på denne side af fjorden først efter "Fox"s afgang. Måger må ikke jages fra 1. maj til 15. august.

Om sommeren skal hver mand være hjemme fra jagtture eller andre udflugter inden kl. 10 om aftenen såfremt ikke særlig tilladelse er indhentet fra bestyreren til at være ude længere, Om vinteren skal enhver passe at være hjemme inden det bliver mørkt.

Når moslaget om sommeren er tørt, skal der anvendes yderste forsigtighed på fjældene med brændende tændstikker, cigarer, forladninger eller ved anlæg af ildsteder, at der ikke forårsages fjældbrande.

Fra kryolitbruddets bibliotek vil som regel kun blive udleveret bøger om vinteren, og da 2 gange ugentlig. Hver mand kan erholde 1 bog til låns ad gangen, som ikke må beholdes længere end 14 dage og fremlån af bogen til anden mand er ikke tilladt. Overtrædelse heraf eller slet behandling af den lånte bog, udelukker fra adgang til lån fra biblioteket.

Direktionen for Kryolit Mine og Handels Selskabet.

Jens-Kjeld Jensen:

# Fuglamaðurin og lúsaserfrøðingur í Nólsoy

**Nógvir sjáldsamir danir eru komnir til Føroyar gjøgnum árini, og hetta verður sagt í eini avgjørt positivari merking. Teir hava givið okkara samfelagi íkast á nógvum økjum.**

Ein teirra er Jens-Kjeld Jensen, sum er ein av okkara fremstu fuglafrøðingum. Vit vóru í Nólsoy undan páskum við donskum gestum. Teir vóru púra bergtiknir, hóast teir bert vóru har nakrar fáar tímar.

Fyrst fingu teir Marner á Skúr, sonur Juel, sum ferðaleiðara. Hann dugir so sera væl at vísa fólki runt í Nólsoy og at greiða frá. Síðani varð farið inn á gólvið hjá Jens-Kjeld, og hann dugdi ikki minni væl at siga frá, so tað hugtók tey sum inni vóru.

Jens-Kjeld er ikki nakar høgt lærdur akademikari. Í veruleikanum hevur hann bert 7 ára skúlagongd. Tað nærmasta bókligum lærdómi er, at hann er útlærdur kokkur.

Honum dámdi best at ferðast, og hetta førdi hann til Nólsoyar fyri einum 36 árum síðani. Her kom hann at kenna tann navnframa fuglafrøðingin Niels á Botni. Tá fór hann at hjálpa Niels á Botni. Hann hevði longu tá lært at útstappa danskar fuglar hjá einum manni í Køge, sum var eins og Niels, og hevði fingið áhuga fyri fugli. Hjá Niels lærdi hann at útstappa føroyskar fuglar.

Jens Kjeld fann sær konu, Mariu Gulklett, í Nólsoy, og tá Niels doyði tók hann yvir arbeiði hjá honum. Hansara "almenna" starv er at stappa fuglar út, men hann fæst eisini við so nógv annað.



*Jens Kjeld greiðir frá. Maðurin høgrumegin er Marner.*



*Drunnhvíti.*



*Hetta er ein høvuðlús á havhesti. Havhestur hevur fýra sløg av lúsum, sum halda til á fýra ymiskum pørtum á havhestinum Hetta slagið er altíð á høvdinum ella hálsinum.*

### Lundapisurnar sum funnu heima aftur

Væl dugur Jens Kjeld at greiða frá viðurskifti um fugl, sum vit onnur einki vita um. M.a. um lunda. Lundin heldur til á landi á sumri, men móti heysti hvørvur hann. Eingin veit, hvar hann fer, uttan tað at hann er til havs. Ringmerktir lundar geva onga ábending. Teir eru funnir á heilt ymiskum leiðum. Men væl finnir lundin aftur. Hann kemur altíð aftur – um ikki í somu holu so í hvussu er í sama stað. Tað er eitt sera sjáldsamt dømi um hetta. Fyri nøkrum árum síðani oyddi ein oljudálking eitt stórt øki í Fraklandi. Tá økið varð reinsað aftur, ynsktu teir at fáa lundapisur at sleppa har. Teir fingu fatur í nøkrum pisum í Mykinesi, ringmerkti tær, og koyrdu tær í eina pappeskju, og síðan vóru tær sendar avstað við flogfari. Tá ein tíð var fráliðin komu fleiri av hesum pisunum aftur til Mykinesar, og tær vórðu funnar aftur innan fyri 100 metrar frá holuni, haðani tær vóru tiknar. Tann heilt stóra ósvaraða gátan er, hvussu tær funnu heim aftur.

Eitt annað dulsmál viðvíkjandi lunda er, hvussu teir kunnu hava nevið fult av smáfiski uttan at missa teir, tá tann seinasta verður tikin! Tað hevur verið upptalt, at ein sildberi hevur havt 80 lodnumurtar og 2 nebbasildir í nevninum í senn

Víst hevur lundi ein feril av einum agnhaldi í nevninum, men kortini…

### Drunnhvítin flýgur 30.000 km árliga!

Jens-Kjeld er annars mest kendur fyri sítt arbeiði við drunnhvíta. Hann kallast so vegna hvíta plettin á afturpartinum. Hetta er ein ikki minni merkisverdur fuglur. Hann vigar umleið 30 gramm, og hvørt ár fer hann tann 15.000 km langa teinin til Suðurafrika. Um várið kemur hann aftur tann sama langa vegin. Tað er einki við at hann sveimar sum aðrir fuglar, sum ger ferðina lættari. Nei, hann sveiggjar við veingjunum allan vegin. Hvussu skjótt hann flýgur kann fáast ein ábending um, tá vit vita, at ein drunnhvíti, sum Jens-Kjeld fangaði í Nólsoy var ringmerktur 24 tímar frammanundan eysturi í Skotlandi. Teinurin higar er 650 km. Teir koma aftur í sama stað hvørt ár, og teir gerast gamlir. Jens-Kjeld hevur havt ein drunnhvíta á hondum, sum var ringmerktur 32 ár frammanundan sum vaksin.

Eggið hjá drunnhvíta vigar bert 8 gramm, og drunnhvíti bølir eggunum í einar 40 dagar, sum er nógv longur enn hjá fugli annars. Fyri at sleppa undan at rovdjór amast upp at reiðrinum, vitjar drunnhvítin bert reiðrið á nátt. Tá pisan er klakt, verður hon fóðrað hvørja nátt í 50 dagar. Tá er hon ovurfeit, og tá kunnu foreldrini ríma frá henni. Tá 8-12 dagar eru farnir, hevur pisan mist so mikið av vektini aftur, at ferðin til Suðurafrika kann byrja. Pisan kemur heim aftur, tá hon er 2 ár og byrjar at yngla, tá hon er 3-4 ár.

Í Nólsoy verður roknað við, at her er heimsins størsta koloni av drunnhvíta. Tað er ringt at seta tal á, kanska 50-100.000 fuglar. Ein orsøk til hetta stóra tal er, at av eini ella aðrari grund, er rottan ongantíð komin til Nólsoyar. Aðra staðni er tað hon, sum hevur beint fyri drunnhvítanum eins og fyri øðrum fugli.

Drunnhvítin býr í grótrúgvum og holum, og hann fer upp at flúgva um náttina. Hetta er eitt ferðamannamál av teimum stóru. Jens Kjeld skipar fyri ferðum, har hann merkir drunnhvíta, og tá sleppa ferðafólk við. Farið verður eystur um á Nólsoynni, og knappliga fer alt á flog. Hetta verður sagt at vera ein rættiligt uppliving. Jens Kjeld setur net upp, og fuglur, sum kemur í netið, verður ringmerktur. Á hendan hátt hevur Jens Kjeld ringmerkt 25.000 drunnhvítar, og er hetta eitt stórt íkast til kanningina av lívinum hjá hesum lítla fugli.

### 2 kg av mýs

Jens-Kjeld arbeiðir eisini við øðrum djórum, sum t.d. mýs, sum tað er fitt av í Nólsoy. Tá vit vóru har, væntaði hann sær vitjan av einum lesandi úr Bretlandi, sum skuldi kortleggja lívið hjá músum. Her var nóg mikið at studera, tí Jens Kjeld hevur 2 kilo av músum liggjandi.

### Funnið 199 nýggj lúsasløg

Afturat hesum er Jens-Kjeld serfrøðingur í lúsum! Hetta er ein kykna, sum fær okkum onnur at øtast og vamlast.

Jens Kjeld hevur saman við Ricardo L. Palma úr New Zealandi gjørt eina ritgerð um lús í Føroyum. At hetta er eitt stórt evni sæst av, at ritgerðin telur heilar 24 síður.

Í ritgerðini verður sagt, at í Føroyum eru skrásett 306 heimahoyrandi fuglasløg. Hetta merkir í sær sjálvum eisini eitt stórt tal av lúsasløgum. Hóast hetta hevur vitanin um lýs verið rættiliga avmarkað.

Fyrstu ferð skrivað er um lýs er hjá Landt í 1800. Ein Waterston hevur í 1912 gjørt eitt yvirlit yvir lúsasløg. Tá vóru staðfest 27 ymisk lúsasløg. Men nú er gjørd ein rættilig kortlegging av teimum ymsu lúsasløgunum. Lýsnar koma frá nýliga deyðum fugli frá veiðumonnum, frá fugli, sum er funnin deyður, frá livandi fugli og frá útstappaðum fugli í Zoologiska savninum í Keypmannahavn. Lýs eru eisini funnar á djórum, og man seyður telja væl við her.

Hervið var talið av lúsasløgum komið uppá 215 sløg í Føroyum. Men síðan ritgerðin er gjørd eru 11 sløg av lúsum komnar afturat, so nú er talið komið uppá 226, so tað kundi væl hent, at tað eru enn fleiri. Av hesum eru 2 lúsasløg, sum als ikki hava verið kend fyrr. Í veruleikanum skuldu slíkar lýs verið uppkallaðar eftir Jens-Kjeld! Men frammanundan er ein summarfuglur uppkallaður eftir honum, og tað er eisini hugaligari enn um tað var ein lús.



*Her sæst eitt úrval av ymisku fuglunum, sum Jens-Kjeld hevur stappað út.*

### Hystarí um fuglakrím

Jens-Kjeld tekur eisini til orða í almenna orðaskiftinum, sum t.d. um fuglakrím. Hann heldur, at hetta er blást alt ov nógv upp. Hann sigur, at har fuglakrím herjar, livir fenaðurin inni í húsinum, og har eta tey sjálvdeyðan fugl og drekka blóðið.

Smittuvandin undir slíkum umstøðum kann ikki sammetast við tey viðurskifti, vit hava í Føroyum, tá tað snýr seg um fugl.

Sum sagt, so er ein slíkur maður sum Jens-Kjeld ein fongur fyri okkara samfelag. Vit mugu bert vóna, at hann fær tær sømdir til at gera sítt arbeiði, sum hann hevur uppiborið.

# Fiskivinnan í Hetlandi

*Vertirnir frá SFA, fiskimannafelagnum í Hetlendandi. Teir eru f.v.: Hanson Black, skrivari hjá SFA, Martin Leyland, stjórin á uppboðssøluni og Brian Isbister, leiðari á PO, produsentorganisatiónini.*



Í døgunum 21. til 23. apríl var stjórnin í FF á eini ferð í Hetlandi. Endamálið var at kunna seg um støðuna í okkara næsta grannalandi, og serstakliga innan fiskivinnuna. Ferðin var stak væl eydnað og nógv kom burtur úr, sum tað eisini kemur til sjóndar í teimum frásøgnum, sum vit hava í FF blaðnum frá ferðini.

Fremsta málið var at vitja okkara bróðurfelag í Hetlandi – The Shetland Fishemen's Association – SFA. Vit hava havt samband við hetta felagið í mong ár. Hetta er fremst at takka John Goodlad fyri. Hann var ein markantur leiðari í SFA í mong ár. Vit hittu hann fyrstu ferð, tá ið hann kom til Føroyar sum ungur lesandi í 1977, og síðani hava vit havt samband av og á. John Goodlad er ikki longur í umrødda starvi. Nú er hann alari og hevur eisini áhuga í kalvaaling. Men hann fyriskipaði ferðina og legði skránna til rættis.

Fyrst á skránni var tí eisini at vitja SFA, tá vit komu til Hetland fríggjamorgunin. Skrivstovan hjá SFA liggur á havnarøkinum í miðbýnum í Lerwick.

### Fiskimenn øðrvísi skipaðir enn í Føroyum

Fiskimenn í Hetlandi eru øðrvísi skipaðir enn í Føroyum. Ein stórur partur av fiskimonnum her eiga skipini sjálvir ella partar í teimum. Teir avtala sínámillum, hvussu veiðan skal býtast. SFA er tískil umboð fyri bæði skip og fiskimenn.

Felagið varð stovnað í 1947 og komandi ár hevur tað tískil 60 ár á baki. Limatalið er umleið 120 bátar og skip við manning, og teir hava eina nevnd sum telur 18 mans. Teir eru við í útgávuni av Shetland Fishing News. Tey, sum hava áhuga fyri tí, kunnu finna blaðið á alnótini.

Felagið hevur sama endamál sum øll onnur feløg nevniliga at berjast fyri korunum hjá limunum. Hetta gera teir mótvegis egnum myndugleikum, men ikki minst mótvegis ES myndugleikunum í Bruxelles. Her samskipa teir seg við meginfelagið fyri skotskar fiskimenn, sum teir eru ein partur av sum eitt av 8 limafeløgum.

Í sambandi við oljuvinnuna umboða teir eisini veiðuliðið mótvegis oljuvinnuna og sum tað skilst er eisini eydnast teimum at tryggja, at oljuvinnan darvar fiskiveiðuna minst gjørligt.

Teir arbeiða eisini fyri áhugamálunum hjá teirra limum við luttøku í øðrum stovnum. Eitt dømi um hetta er tað, sum kallast PO ella produsentorganisatiónin, sum er eitt serligt ES fyribrigdi. Tess høvuðsendamál er at javna prísirnar. Eitt ávíst gjald av øllum avreiðingum verður latið PO. Afturfyri eru fiskimenn tryggjaðir ein minstaprís. Ein nýggj uppgáva er at keypa kvotur til limirnar, og hesar mugu so útvegast úr restini av Bretlandi.




*Modell av hetlendskum trolara á skrivstovuni hjá SFA.*

### Uppboðssølan

Teir eru eisini við sum partur í uppboðssøluni í Lerwick. Hon varð sett á stovn í 1999. Í 2003 varð hon gjørd elektronisk við eini hollendskari søluskipan, ið nýtur klokku og har trýst verður á ein knøtt, tá boðið verður. Hetta var eitt sera stórt framstig. Sølan gongur nógv skjótari, og tað ber til hjá keyparum aðra staðni frá at bjóða upp á fiskin. Hetta hevur stóran týdning, tí tað allarmesta av fiskinum fer til keyparar aðra staðni – serliga í Bretlandi. Hann fer tískil óvirkaður "av landinum".

Dentur verður lagdur á at kunna mest møguligt um, hvussu uppboðssølan virkar og tann, sum hevur áhuga fyri hesum kann fara inn á heimasíðuna: **www.shetlandAuction.com**

Tað eru vanliga 11-12 sum bjóða, men hesir umboða meira enn 100 keyparar, so áhugin tykist at vera stórur. Tað eru fýra uppboðshaldarar knýttir at uppboðssøluni. Tað eru ikki bert hetlendingar sum landa har. Tað eru eisini skotar og norðmenn, og teir gera góðan mun.

Fyrimunurin við at hava uppboðssølu í Hetlandi er, at hon liggur sera væl fyri í mun til fiskileiðirnar. Hetta hevur týdning fyri siglingina hjá skipunum og harvið oljunýtsluna, nú oljan er vorðin so dýr. Hetta merkir eisini, at fiskurin er feskari, tá hann verður landaður.

Vansin er tann, at teir liggja nakað fjarskotnir í mun til marknaðin. Tað tekur 12 tímar at sigla inn á meginlandið, og tað er "bert" ein fartur um dagin. Hetta er nakað tann sama støðan sum hjá okkum í Føroyum, men júst hesin vansin er størri hjá okkum við størri fjarstøðu og færri fráferðum. Vit høvdu verið fegin um at havt ein fart av landinum annan hvønn dag. Men alt samanumtikið er uppboðssølan kappingarfør. Tað er eisini ein fyrimunur hjá teimum, at teir í ein ávísan mun hava fingið stuðul frá ES til hesa íløguna.

Við skipaðum uppbýti og sortering av fiskinum verður dentur lagdur á at fáa fiskimenn at koma inn við fiskinum so feskum sum gjørligt.

Teir lata væl at gongdini hjá uppboðssøluni, hóast hon er minni enn tann hjá okkum. Í 2005 øktist nøgdin úr 6.443 t. í 2004 til 7.173 t., ella 12%. Men samlaða virðið á landingunum hækkaði samstundis við 26% til 8,7 mio. pund, umleið 90 mio kr. Hetta gevur ein miðalprís uppá 13 kr. pr. kg og verður mett sum ein góð gongd.

Eisini alifiskur verður seldur á uppboðssøluni.

### Smáur fiskur

Vit vitjaðu eisini á uppboðssøluni. Her var nógvur fiskur, serliga hýsa og hvítingur.

Tað fall í eyguni, at fiskurin var so smáur. Sumt var eisini ókruvt. Frágreiðingin var tann, at fiskurin varð veiddur nær landi. Afturat hesum kom, at tá hann kortini skuldi av landinum óviðgjørdur, kundi hann landast fríggjadag upp á at fara óvirkaður inn á meginlandið. Teir, sum veiddu longri úti, fingu størri fisk. Tað var hesin sum varð virkaður í Hetlandi, og tí varð landaður fyrr í vikuni. Annars hevur tað júst í hesum døgum verið serliga góður prísur fyri tann smáa fiskin eins og hjá okkum. Vit sóu nakrar toskar. Teir vóru harafturímóti sera stórir.

### Týdningurin av fiskivinnuni

Fiskivinnan hevur altíð havt stóran týdning í Hetlandi. Í fyrsta umfari sum matur til fólkið, ið har býr og síðani sum útflutningsvøra.

Veiðan kann býtast í tveir partar. Tann størri parturin er veiðan av "vanligum" fiski, sum aftur kann býtast upp í botnfisk og uppsjóvarfisk. Hin parturin er veiðan av ymiskum sløgum av skeljafiski.

Botnfiskaveiðan var 6.500 tons í 2003, og hevur hon havt eina afturgongd uppá 40% síðan 2001. Men verður farið longur aftur, er afturgongdin enn størri. Í 1986 var hon 19.000 tons, so samalaða afturgongdin hevur verið nærum 2/3.



*Uppboðssøluhøllin.*



*Fiskurin var ótrúliga smáur, men júst í hesum døgum fekk hann høgan prís.*



*Meginparturin av botnfiskinum, sum kemur upp á land í Hetlandi, fer óvirkaður inn á meginlandið. Men smáar fyritøkur eru við at taka seg upp, sum virka fisk. Her síggja vit eina sera lítla fyritøku við einum hjúnum, sum við handamegi skrælla hýsu og síðan skera hana til flak. Tilsamans vóru tey trý á virkinum.*

Eftir eru 20 bátar í støddini 15-25 m, sum fyrst og fremst veiða við troli alt árið. Tað eru 7-8 uppsjóvarskip upp á 50 metur og longri, sum veiða við pelagiskum troli, og hesi skip veiða í ásettum tíðarskeiðum.

Størsta tali av bátum, nevniliga umleið 115, eru bátarnir sum veiða skeljafisk við dreggjum og rúsum. Summir veiða alt árið, men teir flestu veiða í ásettum tíðarskeiðum og bert ein part av árinum.

Samlaðu landingarnar í 2004 vóru 90.000 tons og virðið var 37,4 mio. pund. Av nøgdini áttu uppsjóvarskipini 89%, botnfiskabátarnir 10% og skeljabátarnir 1%. Men verður hugt eftir virðinum vóru tølini í somu røð 71, 24 og 5%.

Tey týdningarmestu botnfiskasløgini eru hýsa, toskur, hvítingur, havtaska, reyðsprøka og tunga.

Verður hugt at vektini av teimum 9.000 tonsunum, sum vórðu landað í 2004, so vóru hýsa 38%, havtaska 15%, toskur 11%, hvítingur 8% og annað 28%. Verður hugt eftir virðinum er hýsa 27%, havtaska 27%, toskur 20%, hvítingur 7% og annað er 19%.

Tey pelagisku fiskasløgini eru makrelur, sum umboðar 59% av vektini og 88% av virðinum, sild umboðar 23% av vektini og 9% av virðinum og svartkjaftur umboðar 18% av nøgdini og 3% av virðinum.

Síðani eru ymisk sløg av skeljadjórum, har jákupsskel umboðar 52% av vektini og 63% av virðinum. Restin er ymisk sløg av krabbum, hummari og goggur. Veiðan av skeljafiski er um 1.000 tons, so her er ikki nógv í part.

Í Hetlandi var arbeiðsstyrkin 12.270 fólk í 2003. Í teimum ymisku greinunum av fiskivinnuni eru hesi arbeiðspláss:

| | | |
|---|---|---|
| Veiða | 664 | 5,4% |
| Aling | 1165 | 9,5% |
| Fiskavirking | 448 | 3,7% |
| Tilsamans | 2.277 | 18,6% |

*Prosentini eru roknað út frá samlaðu arbeiðsmegini.*

Í øðrum vinnugreinum vóru størvini í 2003: í almennari umsiting 24%, oljuvinna 7%, landbúnaður 7%, ferðavinna 3%, binding og tøting 1% og annað 39%. Hjá fiskivinnuni er talan um eina munandi minking í prosentpartinum í mun til 2002.

Av samlaða búskapinum upp á 750 mio. pund, umboðar fiskivinnan uml. 30%.

Samanumtikið er fiskivinnan framvegis ein munandi partur av hetlendska búskapinum.

Her er nógv sum spælir inn, sum t.d. ávirkan av ES, minkandi stovnar, serliga verður toskastovnurin mettur at vera hóttur. Tað verður kanska heldur ikki gjørt nóg mikið frá teimum ymiskum myndugleikunum at stuðla fiskivinnuni. Tað kann eisini leggjast afturat, at teir flestu fiskimenn í ES londunum kunnu ikki torga rikna fiskivinnupolitikkin. Hetta er eisini galdandi fyri fiskimenn í Hetlandi.

**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
**FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**

## 1. meistari til Fiskiveiðieftirlitið

Eitt starv sum 1. meistari við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, at seta sum skjótast.

Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávir:
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

Førleikakrøv:
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi *(STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer)*.
- Fyrimunur við 3 ára maskinmeistaraútbúgving
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa
- Aldur og heilsu til at gerðast kavari. Fyrimunir men ikki krav.

Setanartreytir:
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 31. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarfelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnum undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. meistari.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Umsóknir:
Umsóknir við cv, saman við avriti av prógvum, vinnubrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 10. mai 2006 kl 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

Fiskiveiðieftirlitið
postsmoga 347, 110 Tórshavn

*Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Elmar Højgaard, leiðara.*

# ALS-málið hjá Kára samtykt

Sum vit greiddu frá í einum undanfarnum blað, legði Kári P. Højgaard, 3. mars vegna Sjálvstýrisflokkin fram soljóðandi uppskot um ALS:

**Heitt verður á landstýrismannin í vinnumálum um fyrst í komandi tingsetu at leggja fram uppskot um broyting í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, soleiðis at fiskimenn kunnu fáa útgjald frá ALS, tá skip teirra liggur óvirkið, ella fiskimenn á annan hátt eru avskornir frá inntøku við skipinum.**

Í viðmerkingunum var m.a. sagt, at leingi hevur verið í umbúnað at dagføra lógina um ALS, men enn er einki hent. Serliga hevur stríð staðið um støðuna hjá sjófólki. Lógin hóskar best til umstøðurnar hjá fólki á landi, ikki til støðuna hjá teimum, sum eru knýttir at einum skipi.

Talan er helst um eina ávísa avbjóðing at orða reglurnar, so tær bæði kunnu tryggja fiskimenn og heimila ALS at meta um og steðga møguligum missbrúki. Eitt er tó greitt, verandi støða við, at sjófólk gjalda inn til skipanina, og stóru trupuleikarnir við at fáa pening útgoldnan úr skipanini, kann ikki halda fram.

Uppskotið hevur verið til viðgerðar í vinnunevndini, sum legði fram soljóðandi álit:

Álit

Sjálvstýrisflokkurin hevur lagt málið fram tann 3. mars 2006, og eftir 1. viðgerð tann 15. mars 2006 er tað beint vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 27. og 30. mars og 6. apríl 2006.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í vinnumálum og við umboð fyri ALS og Føroya Fiskimannafelag.

Í uppskotinum verður mælt til broyting í ALS-lógini soleiðis, at fiskimenn kunnu fáa útgjald frá Als, tá skip teirra liggur óvirkið, ella fiskimenn á annan hátt eru avskornir frá inntøku við skipinum.

Er orsøkin til, at skipið liggur óvirkið, at tað hevur verið fyri tryggingarskaða, er inntøkan hjá fiskimonnunum tryggjað við kravdari trygging.

Fyri at fáa útgoldið stuðul frá ALS, eru treytirnar m.a., at ein er arbeiðsleysur og tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Sum prógv fyri arbeiðsloysinum krevur ALS uppsøgn frá seinasta arbeiðsgevara, og sum prógv fyri at ein er tøkur, krevur ALS m.a., at viðkomandi váttar at vera til reiðar at átaka sær eitthvørt fulltíðar starv í Føroyum. Kemur ein fiskimaður til ALS við eini uppsøgn frá sínum seinasta arbeiðsgevara, og er fiskimaðurin til reiðar at átaka sær eitt annað starv, sum ALS ávísir honum, so hevur fiskimaðurin sama rætt sum øll onnur til útgjald frá ALS. Tað er ein misskiljing, tá sagt verður, at ALS setir krav um, at fiskimaðurin í hálvt ár ikki kann fara við sama skipið.

Nevndarviðgerðin hevur víst, at kunningin um rættindini hjá fiskimonnum ikki hevur verið nóg góð og at nóg nógv heldur ikki verður gjørt fyri at finna loysnir innanfyri karmarnar av verandi skipan. M.a. tá skip fara til størri yvirhálingar, sum strekkja seg yvir longri tíð. Verður fiskimaðurin tá uppsagdur, hevur hann sama rætt sum øll onnur til útgjald frá ALS.

Samsvarandi hesum setir nevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Samtyktin verður orðað soleiðis:

"Heitt verður á landsstýrismannin í vinnumálum um at virka fyri, at funnin verður ein loysn upp á trupulleikarnar hjá fiskimonnum at fáa útgjald frá ALS, tá skip teirra liggur óvirkið."

Og samstundis verða orðini í heitinum á løgtingsmálinum "um broyting í løgtingslóg" strikað.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið við nevndu broytingum.

Málið var til endaliga viðgerð í tinginum seinasta fríggjadag. Tá varð uppskotið við uppskotna broytingaruppskotinum samtykt av einum samdum tingi.

Hetta meta vit sum eitt gott stig á leiðini at fáa eina skipan, sum fiskimenn kunnu liva við.

Hetta gevur helst eisini grundarlag fyri, at manningarfeløgini lata seg umboða aftur í ALS-stýrinum. Roknast má við, at stóra arbeiðið at fylgja løgtingssamtyktini fara at fara fram í stýrinum.

FF í Hetlandi:

# Flaggaðu fyri drotningini og fiskimannafelagnum

Rættiliga fitt varð gjørt burtur úr vitjanini hjá Fiskimannafelagnum í Hetlandi.

Hetlendska útvarpið hevði eina samrøðu við Óla Jacobsen, og sendinevndin varð boðin til ein bita hjá Shetland Island Counsil, SIC, í the Town Hall. Her var flaggað við føroyskum flaggi og við Union Jack í sambandi við føðingardagin hjá drotningini, sum fylti 80 ár júst henda dagin.

SIC er hægst valdi myndugleiki í Hetlandi. Fýra limir vóru til staðar. Hetta váttar ein hampiliga stóran áhuga. Teir vóru sera fegnir um tað økta sambandið millum Føroyar og Hetlands. Ikki minst við tí nýggju flogrutuni hjá Atlantsflog. Hjá teimum kemur tað sera væl við at kunna flúgva beinleiðis úr Hetlandi til London.

Frammanundan hava teir altíð verið noyddir at fara umvegis Aberdeen. Tað skilst eisini, at nógv er bílagt á hesi rutu.

Á samkomuni vóru heilsanir bornar fram. Her varð tikið til 100 ára gamla sambandið, sum hevur verið millum Føroyar og Hetland. Í 19. øld veiddu fleiri hundrað hetlendingar undir Føroyum, og vit fingu eisini línuna úr Hetlandi. Men einki varð sagt um tær føroysku genturnar, sum eftir øllum at døma vórðu rændar av hetlendskum fiskimonnum í 1800-talinum!

### Politiska skipanin

Tað var rættiliga áhugavert at fáa innlit í teirra politisku skipan. SIC heldur til í tí stásiliga bygninginum Town Hall, har tað fyrr var møguligt at koma inn í tann vakra fundarsalin og síggja konur sita og tøta ein dag um vikuna.

Upp á spurningin um, hvussu tað var við býráðnum í Lerwick, var svarað, at teir høvdu einki býráð longur. Tað var avtikið fyri einum 30 árum síðani. Í Hetlandi er bert ein lokalur politiskur myndugleiki, og tað er SIC, mótvegis okkum, sum hava bæði landsstýri og kommunur. Hetta merkir, at lokal mál, sum ein kommuna átti at tikið sær av, verða avgreidd sentralt av SIC.



*Tað varð flaggað við Merkinum vegna vitjanina hjá fiskimannafelagnum. Eisini var flaggað við Union Jack í samband við 80 ára dagin hjá bretsku drotningini.*

Tað finnast tó 18 Community Counsils, lokalráð, kring landið, men hesi hava sera avmarkaðar heimildir og fíggjarætlan. Hesi ráðini kunnu ikki taka avgerðir av týdningi, men tey eru ráðgevandi fyri avgerandi politiska myndugleikan, kanka eins og t.d. Kaldbaksnevndin. Tað áhugaverda er annars, at meðan bert 2 ella 3 kvinnur eru limir í SIC, so er 17 av 18 formonnum í lokalu ráðunum kvinnur. Í SIC eru 22 limir, og teir verða valdir í eins nógvum valdømum. Hetta merkir, at bert ein limur verður valdur í hvørjum valdømi. Í fleiri førum er bert eitt valevni, sum so verður valt uttan atkvøðugreiðslu. Nú er ætlanin bæði at minka um talið á ráðslimum og at økja um støddina á valdøminum, so fleiri verða vald í hvørjum valdømi. Hetta fer heilt vist at føra til val í øllum valdømum.

Ráðið hevur fastan fund 6. hvørja viku og heraftur at koma so allir nevndarfundirnir.

### Eingin poltikkur

Tað er eisini áhugavert, at 18 av limunum eru valdir uttanflokka. 4 verða valdir politiskt, og teir umboða allir Liberala flokkin, sum altíð hevur staðið sterkur her. Hetta merkir, at einki eitur samgonga ella andstøða.

Tað kann verða nevnt her, at Hetland og Orknoyar senda eitt umboð í felag til parlamentið í London, og Hetland eigur einsamalt eitt umboð í skotska parlamentinum í Edinburgh. Hesir limirnir hava annars eina skrivstovu í Lerwick, har fólk, sum hava ørindi til teirra, kunnu venda sær. Hetta kunnu teir gera, tí teir hava ikki annað politiskt starv, og kunnu tí nýta alla sína orku til hesi tingstørvini. Tann fríggjadagin, vit vóru har, skipaðu tinglimirnir fyri almennum fundi um sítt virksemi.

Ein ríkisumboðsmaður er í Hetlandi. Hann umboðar meginstjórnina, og býr á Bressay, oyggin sum liggur beint uttanfyri Lerwick.

Tað ber til at lesa meira um politisku skipanina á heimasíðuni:

www.shetland.gov.uk

### Kundu klára seg sjálvar fíggjarliga

Tað áhugaverda er, at Hetland uttan nakað hóvasták kundi verið fíggjarliga óheft av restina av Bretlandi. Skipanin hjá teimum er soleiðis, at tann skattur, teir gjalda, fer í ríkiskassan í London, og so fáa teir aftur eftir ávísum reglum. Teir siga, at munandi meira av teirra skattakrónum fara til London enn tað, teir fáa aftur. Annars er fíggjarlógin hjá SIC 120 mio. pund ella um 1,3 milliardir krónur.

Afturat hesum eiga teir so oljugrunnin. Inntil fyri fáum árum síðani varð eitt gjald upp á nakrar pensar lagt á hvørja oljutunnu, sum kom upp á land í Hetlandi. Henda pening slapp Hetland at ráða yvir. Hetta munaði so nógv, at tá mest var í hesum grunninum, áttu teir um 5 milliardir. Nú verður bert brúkt úr grunninum til almenn gagnlig endamál, sum t.d. at seta pening í Smyril Line, men framvegis er talan um stórar upphæddir, sum eru eftir.

Hóast, ella kanska vegna hesa góðu fíggjarligu støðu, so hevur fólkið ongan hug at gera stórvegis broytingar í politisku skipanina. Tey hava tað gott sum er. Men nú er hetlendska flaggið – blátt við hvítum flaggi – meira ella minni viðurkent, og so krevja teir ikki meira. John Goodlad, sum er umrøddur aðrastaðni, royndi seg eina tíð við einum Shetland Movement, sum var eitt slag av eini sjálvstýrisrørslu. Men hetta fekk ikki ta stóru undirtøkina og datt burtur aftur.

### Alment um Hetland

Um Hetland er annars at siga, at fólkatalið var tað sama við fólkateljingina í 2001 sum í 1931, nevniliga um 22.000 fólk. Fólkatalið í Lerwick er økt úr 4.200 til 6.800, og er tað minkað samsvarandi í restini av landinum. Fara vit aftur til 1900 var fólkatalið 28.000. Í mun til hetta er talan um eina munandi lækking, meðan tað hevur verið beint øvugt hjá okkum. Arbeiðsloysið er so at siga einki, bert 2%.

Binding av ullvørum hevur – eins og í Føroyum – verið eyðkenni fyri Hetland. Samlaða virðið av bundnavørum var 2,5 mill. pund í 2003. Størsti parturin 36% verður útfluttur til Japan. Ferðavinnan er støðugt vaksandi.

Hildið verður, at her liggja eini 400 arbeiðspláss, sum er rættiliga fitt. Ferðafólk leggja góðar 100 mio. kr. eftir seg árliga.

Í Hetlandi eru 13.500 bilar, og er hetta nógv í mun til fólkatalið.

Í Hetlandi koma ikki nógv "dagbløð" út. Stóra blaðið The Shetland Times kemur út eina ferð um vikuna, nevniliga fríggjadag. Tað kemur út í 11.260 eintøkum, so roknast kann við, at øll lesa hetta blaði. Tey fáa eisini tíð til at lesa tað, áðrenn tað næsta blaðið kemur út. Síðan eru tvey smærri bløð, sum koma út eina ferð um mánaðin og eina ferð hvønn ársfjórðing. BBC sendir tíðindi úr Hetlandi 5 kvøld um vikuna.

Samanum tikið kann sigast, at tað var áhugavert at vitja Hetland, og vónandi kann okkara lýsing av hesi ferð geva føroyingum brell at fara hagar.




*Hetta er búmerkið hjá Shetland Island Council. Tekstin **"Med løgum skal land byggja"** skilja vit helst betri enn teir. Men hetta sigur nakað um tað tilknýti, sum hetlendingar kenna mótvegis tí norðurlendska. Eitt annað dømi er krossurin í flagginum.*



*John er ein dyggur partur av Hetlendska samfelagnum. Her sæst hann saman við konu síni Vilma.*



*Limir í Shetland Island Council. F.v.: William H. Manson, John Inkster, Florence Grain og William N. Stove, øll uttanflokka.*



*Formaðurin í Shetland Island Council er Alexander J. Cluness úr Lerwick. Hann er ein av teimum fáu politiskt valdu, og er hann ein "Scottich Liberal Democrat". Hann verður roknaður sum ein sera góður føroyavinur. Samstundis verður hann roknaður fyri at vera meira at kalla sjálvstýrissinnaður. Hann var ein av teimum, sum saman við John Goodlad, var við til at stovna "Shetland Movement".*

# Enn ein mynd av Palla Bager

Haldane frá fornminnissavninum hevur sent okkum hesa góðu myndina av Palla Bager, hvørs kokkaskúla vit umrøddu í seinasta blað

Palle Bager er her aftanfyri handilin í V.U. Hammershaimbs gøtu saman við báðum teimum yngstu døtrunum og einum av eldru beiggjunum.




# Volunteer og Ruth

Í frágreiðingini um skyldskapin hjá manningini á Volunteer í seinasta blaði eru feilir komnir í. Tað rætta er, at nr. 3,9 og 10 eru brøður, 15 og 12 eru feðgar, 5 og 14 eru feðgar, 17 og 18 eru brøður og 3 og 16 eru feðgar.

Í blaði nr. 364 er ein manningarmynd, sum vit fara at koma aftur til í komandi blað. Hetta er manning á "Ruth" við Olivur Thomsen sum skipara. Vit fara eisini at greiða frá Olivur, sum var ein av okkara kendu skiparum.

Vit eru annars sera fegin um tann stóra áhugan sum er fyri hesum myndum. Hann ger, at vit fáa staðfest nógvar fiskimenn.

# Norðurlendsk ráðstevna um tilfeingisrentu

**Í døgunum 3. og 4. mai er skipað fyri eini norðurlendskari ráðstevnu um "Økonomisk Forvaltning af Fiskerierne". Tað eru Fiskimálaráðið og Norrøna Ráðið, sum skipa fyri ráðstevnuni.**

Ráðstevnan snýr seg fyrst og fremst um spurningin um gjald av tilfeingisrentu til tað almenna. Fyrilestrarhaldarar eru úr Føroyum, Danmark og Íslandi.

Tilfeingisrenta er tað avkast, sum fiskiskapur gevur av sær í mun til íløguna, og spurningurin er so, um ein partur av hesum avkasti skal fara í landskassan "afturfyri" at fiskastovnarnir eru "ogn Føroya fólks". Skal hetta gerast, er næsti spurningur, hvussu stórt avgjaldið skal vera.

Greitt er, at tey, sum umboða fiskiveiðu undir Føroyum, hava einki ímóti, at hesi viðurskifti verða viðgjørd. Og verða tey viðgjørd til lítar, kundi kanska borið til at fingið eina breiða semju um hetta málið. Men hetta krevur, at vinnan er við í viðgerðini á líka føti við aðrar viðkomandi partar.

### Duld dagsskrá?

Men støðan er tann, at veiðuliðið hevur eina kenslu av, at tað kann rokna við, at "okkurt" verður smoygt niður yvir flotan, uttan at skipaeigarar og fiskimenn vita av tí.

Tá hugt verður eftir skránni fyri ráðstevnuna sæst, at tað eru bert skriviborðsserfrøðingar, sum eru við. Orðaskiftið verður myndað av embætismonnum og ráðharrum. Einki, sum so mikið sum luktar av einum fiskimanni, er í nánd av skránni. Sambært tí donsku skránni sleppur meinigi maðurin at seta spurningar, meðan tað sambært føroysku skránni verður lagt upp til, at hann sleppur at luttaka í kjakinum. Men hetta kann so aldri verða á líka føti við tey, sum hava brúkt mánaðir at fyrireika seg upp á at føra fram síni sjónarmið.

### Falsað tíðindi í sjónvarpirnum grundarlag fyri stigi hjá løgmanni?

Tað, sum ørkymlar enn meira, er tað, sum er gingið fyri seg í Føroyum framman undan. Tað er ikki nakað dulsmál, at tað eru sterkar akademiskar kreftir, sum í fleiri ár hava hótt veiðiliðið við, at tað ikki skal sleppa undan at gjalda fyri fiskirættindi.

Seinasta heyst stungu hógvarnir seg rættiliga undan. Hetta var í samband við eina røð av tíðindum í Degi og Viku, har tað frammanundan var gjørd tann niðurstøða, at tað lættliga kundu fáast fleiri hundrað milliónir í landskassan frá tilfeingisrentu. Hesi tíðindini mugu nærmast kallast miðvís falsan. Upplýsingar úr Noreg og Íslandi vóru kliptir soleiðis til, at teir hóskaðu til "boðskapin". Hetta var so langt úti, at formaðurin í reiðarafelagnum noktaði at luttaka í hesum tíðindaflutningi.

Grundað á hesi "tíðindi" vóru politisku leiðararnir drignir inn í sjónvarpsstovuni, har svarið var greitt frammanundan, sum spurningarnir vóru settir. Millum hesar var sjálvur løgmaður. Hann kíkaði beinanvegin boðskapin, sum var á einum sera ivasamum grundarlagi.

Løgmaður fór beina leið til ta nevndina, sum viðgerð eitt uppskot um endurskoðan av lógini um vinnuligan fiskiskap, við eini áheitan um at taka hetta málið upp. Tað kann vera, at løgmaður hevur heimild til hetta, men at hann ger tað á umrødda grundarlagi kann ikki kennast serliga trygt hjá okkum øðrum.

Spurningurin er eisini, um tað er heilt tilvildarligt, at løgmaður – tá hann í sambandi við sína visjón 2015 – setti ein stategibólk viðvíkjandi tilfeingi. Í hesum bólki er eingin, sum umboðar fiskiskap. Men hin vegin er fremsti talsmaðurin fyri, at fiskimenn skulu gjalda fyri fiskirættindi, við í bólkinum.

### Fiskimenn kenna seg ótryggar

Tað er nú ikki so løgið, um fiskimenn og reiðarar eru í eini verjustøðu, nú hesin spurningur verður tikin upp á hægsta stigi.

Fyri at koma aftur til umrøddu sjónvarpstíðindi. Tað er sjáldan, at ein hevur sæð eitt so "gott" dømi um, hvussu ein einaræðislig pressa virkar. Stutt sagt kann sigast, at hesi tíðindi vóru bluff. Tað kann hava verið í góðari trúgv, men tað er staðfest, at so var ikki. Vit útvegaðu okkum reellar upplýsingar úr Íslandi og Noregi um tilfeingisgjald, og hesir góvu eina heilt aðra mynd. Hesar sendu vit sjónvarpinum og hinum fjølmiðlunum, men teir høvdu als ongan áhuga.

Tað kann verða nevnt her, at rættarnevndin júst hevur framlagt álit í uppskotinum um fjølmiðlaábyrgd.

Her verður staðfest at rættarliga ábyrgdin fyri redaksjonella tilfarinum hjá kringvarpinum liggur í evsta føri hjá kringvarpsstjóranum.

Tískil ivast rættarnevndin í, hvørt fjølbroytni í almenna tíðindaflutninginum er nóg væl tryggjað.

Vit kunnu siga, at hesin ivin er sera væl grundaður. Men spurningurin er hvat ið verður gjørt við hetta!

Tað ber til at lesa úrslitið av okkara kanningum á heimasíðuni: **www.fiskimannafelag.fo** blað nr. 351 og 352.

# Manningarmyndir

Vit fara í hesum og komandi bløðum at hava myndir, har tað eru ein ella nakrir fáir fiskimenn. Hesar eru helst tiknar av Abdsalon Joensen í Íslandi. Vit vilja framvegis sera fegin frætta um nakar kennir menninar á myndunum.













AGN
sild
tobis
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur

...dagligt samband um alt landið
P/F KAMBUR
STRENDUR
telefon: 448095 · fax: 448744

BAADER
Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.
Pf. Petur Larsen
Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85




## Ikki síggja – men trúgva

Síðani sigur hann við Tummas:
"Kom higar við fingri tínum og síggj hendur mínar, og rætt hond tína higar og legg hana í síðu mína, og ver ikki vantrúgvin, men trúgvandi."
*Joh. 20,27*

Tað er rættiliga vanligt, at børn detta ella sláa seg í og fáa blá merkir á kroppin. Merkini hoyrir líkasum við til at vera barn – við lívi í. At tosa við barnið um merkini, um at fáa ilt, kann hjálpa tí at ansa betri eftir eina aðru ferð.

At møta vaksnum fólki, sum hava merkir, og tey vilja tosað um tey, kenst ikki so tungt. Royna tey at krógva merkini og tiga við teimum, kann tað boða frá onkrum meiri álvarsamum.

Jesus bar og ber støðugt merkir á likaminum. Hann er hvørki dottin ella hevur sligið seg í. Hann hevur heldur ikki pínt seg sjálvan.

Teir leiðandi og tænarar teirra "merktu" hann. Teir húðflongdu hann, kroystu tornakrúnuna niður yvir høvur hansara. Armar og bein hansara negldu teir fast til krossin, og ein hermaður stakk spjótið í síðu hansara.

Um øll merkini eftir hørðu viðferðina vóru sjónlig, veit eg ikki. Merkini í hondunum, fótunum og í síðuni vóru tó sjónlig. Jesus royndi hvørki at krógva tey ella at tiga við teimum.

Hann "reypaði" heldur ikki av teimum, ella vísti tey fram sum prógv í tíð og í ótíð. Sjónligu sárini eftir líðing og deyða hansara skuldu **ikki** vera høvuðsgrundarlagið undir trúnni.

Tí segði Jesus við Tummas – tann ivandi: "Av tí at tú hevur sæð meg, hevur tú trúð. Sælir eru teir, sum ikki sóu, og trúðu tó!" Ikki síggja – tó trúgva.

Ápostulin sigur: "Tí at eg skammist ikki við gleðiboðskapin, tí at hann (orðið um Jesus) er Guds kraft til frelsu fyri hvønn tann, **sum trýr** ... "Tí vit ganga í trúgv, **ikki í skoðan**".

Jesus hvørki avvísti ella skeldaði Tummas út fyri hansara iva og vantrúgv, men vegleiddi hann. Harvið sýndi Jesus kærleika, náði og umsorgan sína fyri honum.

Hendingin við Tummasi sýnir, at Jesus er trúfastur, sjálvt tá tað knípur hjá leirusveininum at halda fast við trúnna. Hetta vóru gleðiboð til Tummas – og til tín og mín.

Eingin kemur at standa uttanfyri Paradís, tí trúgv hansara var ov lítil, ov veik. Uttanfyri verða tey vantrúgvandi, tey, sum ikki vildu trúgva, ikki vildu játta syndirnar, sum ikki vildu taka ímóti Jesusi ella ákalla navn hansara.

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein

17. apríl
Minus 2,6 stig og stilli. Frætt er úr Eysturgrønlandi, at "Polar Princess" hevur fingið góð 600 tons av rundum fiski í 14 dagar – gott 225 tons av flaki. Fiskurin er sera góður í stødd.

18. apríl
Minus 3,1 stig og lot av norðri. "Markus" kom inn at millumlanda í morgun, teir løgdu góð 200 tons upp og loystu aftur um 16-tíðina. Teir vóru ikki meira enn leysir av kaiini, so kom "Natarnaq" inn at landa, og teir høvdu um 450 tons inni eftir 14 daga roynd. Teir flestu trolararnir liggja nú aftur í Buðinum, og onkur liggur í øðrum Holinum.

Skeljabáturin "Sonja Kill" kom inn at landa nakað av jákupsskel í dag, og hin skeljabáturin, "Louise L", kom eisini inn í dag við onkrum breki, sum skuldi umvælast. Teir royna nakað norður úr Sisimiut.

20. apríl
Vindur av norðri og - 12,9 stig. "Akamalik" kom inn at landa í morgun; teir hava um 550 tons inni eftir knøppum 14 døgum – óført fiskarí. "Polar Timmiarmiut" er í Nuuk og landar og "Regina C" er í Manitsoq og landar.

Verkfallið hjá innanskers rækjuflotanum er av, og avtala varð undirskrivað í gjár, so allur smábátaflotin hevur aftur loyst frá landi. Sum nú er, eru KNAPK byrjaðir at krevja studning fyri olju eisini, so nú verður spennandi, hvussu tað fer at spæla av.

Teir, sum royna eftir rognkelsum, eru so smátt komnir í gongd, men kuldin er ikki horvin enn, so tað er ikki tað heilt stóra, sum kemur upp á land. Men rogn fáa teir so, um 1.500 til 2.000 kilo um dagin kemur upp á land, og sum eg skilji, so er prísuirn 20 kr. fyri kg, tað liggur um 1 kg av rognum uppá fiskin.

"Lómur" var inni í Illulissat og landaði, teir høvdu góð 70 tons inni.

24. apríl
Tað eru –14,9 stig í dag og lot av norðri. "Markus" kom inn til Nuuk at landa í morgun, teir høvdu fulla last.

25. apríl – Flaggdagin í Føroyum
Minus 11,6 stig og stilli. "Polar Natarnaq" kom inn higar í dag. Teir hava landað í Manitsoq hendan túrin – fulla last.

26. apríl
Minus 11,9 stig, men dýrdarveður. "Salleq" kom inn at landa í morgun, teir hava fulla last – gott og væl 300 tons inni. "Salleq" roynir norðuri í Kassanum, sum vit siga her; teir rokna við at verða leysir aftur í morgin fyrrapartin. "Polar Amaroq" kom til Nuuk at landa í morgun. Teir hava fulla last.













FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569

Enn einaferð váttað:

# Føroyingar eru alla staðni

Á ein tilvildarligan hátt fingu vit enn eina váttan um, at føroyingar sløðast alla staðni. Vit høvdu tíverri ikki ov nógva tíð eftir í Whalsay, tá vit høvdu sæð skipini og vit skuldu náa eina ávísa ferju. Vit fóru saman við versoni Magnusar inn í tann stóra handilin í bygdini. Tá steðgar hann einum kunda og sigur, at hesin man vita okkurt, tí hann hevði føroyska mammu!

Vit so at fregnast og fáa at vita, at mamman býr beint við, og hann bjóðar øllum fylginum niðan at heila upp á hana. Tá vísir tað seg, at hetta er Maria, ella Mia, Jensen, ættað úr Havn. Pápi hennara var Sigurd, sum var hálvbróður Jens av Reyni.



Mia saman við synunum John (th.) og Alec (tv.).

Tá vistu vit beinanvegin hvør hon var. Tíverri var ikki nógv tíð, men fingu vit tó høvi at koma inn í stovuna at fáa eitt prát.

Søgan er tann, at hon hitti ein hermann av Whalsay undir krígnum. Tey giftust og fluttu higar í 1946 ella júst fyri 60 árum síðani. Maðurin var fiskimaður, og hann doyði fyri 25 árum síðani. Tey áttu tríggjar synir. Tann elsti Martin er deyður. Hann búði eina tíð í Føroyum. Tann yngsti John er fiskimaður við einum av bátunum á Whalsay, og býr inni hjá mammuni. Meðan Alec, sum vit hittu, fyrst er við at útbúgva seg til at fara at sigla við vaktarskipi í oljuvinnuni. Hann er giftur við kvinnu úr Tailandi, og tey eiga eitt lítið barn, sum omman sjálvsagt er sera forlipt í.

Mia er 80 ára gomul, og sær sera gott út. Elsta systirin Jensia giftist eisini við hermanni og býr í Glasgow. Hon er 82 ár.

Miu dámar sera væl at búgva á Whalsay, men onkuntíð kemur hon heim at ferðast til systrarnar í Føroyum. Tað var ein stór broyting hjá henni at koma úr Havn og higar at búgva. Í Havn høvdu tey ravmagn. Tað fingu tey ikki fyrr enn í 1960 á Whalsay. Tey nógvu fyrstu árini máttu tey eisini kynda við torvi, og tað kemur ikki til høldar av sær sjálvum! Hon er einasti føroyingur á oynni, og Mia kennir annars ikki nakrar annan føroying í Hetlandi. Men tað er gott at vera her, og hon var sera fegin um at fáa eina so óvæntaða vitjan úr Føroyum. Vit løgdu okkurt eftir at lesa hjá henni, nevniliga seinasta FF-blaðið, men mestur man hon fara at frætta frá okkum aftur.

Abbi Miu var skrivarin Jens Jensen, ættaður úr Sumba. Hann giftist tvær ferðir, og seinnu ferð við Jacobinu av Eiði, sum var omma Miu. Tey bæði fingu tilsamans 5 børn, men fýra teirra doyðu sum smá.

Pápi Miu var Sigurd, sum doyði bert 38 ára gamal. Hann og konan fingu 5 børn. Ein sonur var Óli, men hann doyði eisini ungur. Umframt systrarnar í Bretlandi liva eftir í Føroyum Kalla Sømark í Skálavík og Judith Otthamar í Havn.

Systarnar og annars ættin í Føroyum er uttan iva fegin um at fáa hesa heilsan úr Whalsay!



"Athena", sum John siglir við. Aftanfyri sæst uppsjóvarskipið "Antares".

# 1. mai í Havn

Tað er fast, at Havnar Arbeiðsmannafelag stendur fyri 1. maidagshaldi í Havn.

Røðarar vóru Ingeborg Vinther, Petur Skeel Skarðsá og Vigdis Johannesen. Sum vanligt var komið inn á korini hjá arbeiðarum, og varð víst á, hvussu hesir ofta eru fyri vanbýti. Eisini varð lagt eftir politikkarum, og uttan iva av røttum. Nøkur vóru komin á Vaglið at lurta. Men sigast kann, at av teimum tiltøkum sum verða skipað á Vaglinum á vári og sumri er hetta tað tiltak, har minst av fólki møtir. Hetta er spell, men verður eftir øllum at døma ikki øðrvísi.



Ingeborg á røðarapallinum.

Ein partur av áhoyrarunum.



# Fundur um fasta gerðarrættin

Týsdagin varð skipað fyri almennum fundi, har kunnað varð um nýggju skipanina við føstum gerðarrætti at loysa trupulleikar á arbeiðsmarknaðinum í sáttmálaskeiðnum. Tað var fitt av fólki til staðar. Ein bólkur umboðandi partarnar á arbeiðsmarknaðinum sum í ALS stýrinum hevur barslað hesa nýggju skipanina, sum stórur partur arbeiðsmarknaðurin stendur aftanfyri.

Tað hava fleiri royndir verið gjørdar at fáa okkurt slag av arbeiðsrættarskipan, men hesar hava verið strandaðar vegna mótstøðu frá feløgunum.

Tann leistur, sum nú hevur borið á mál, kemur upprunaliga frá Óla Jacobsen, tá hann var landsstýrismaður í 1998. Tá var ein líknandi nevnd sett at gera uppskot til eina slíka skipan, men har kom tó einki burtur úr. Men í 2003 var sami leistur royndur aftur, og nú bar til. Hetta váttar at arbeiðsmarknaðurin saktans kann greiða egin viðurskifti.



Michael Berner advokatur ummælti fasta gerðarrætt og samanbar við Danmark.

Fundarluttakarar í Norðurlandahúsinum

